LØGMANSSKRIVSTOVAN
LÓGARTÆNASTAN

Dagfesting:
10.02.2015

# Rundskriv

# um

# uppseting og broyting av løgtingslógum og kunngerðum, um uppseting av ríkislógartilmælum og um uppseting av uppskotum til samtyktar frá landsfyrisitingini

Í hesum rundskrivi er ásett, hvussu løgtingslógaruppskot og broytingaruppskot skulu orðast og setast upp. Krøv til innihaldið í viðmerkingum til hesi uppskot verða eisini ásett. Rundskrivið fevnir eisini um orðingar í og uppseting av kunngerðum og broytingarkunngerðum.

Harumframt er ein serstakur partur um uppseting av ríkislógartilmælum og ein serstakur partur um uppseting av uppskotum til samtyktar frá landsfyrisitingini.

Rundskrivið er ikki galdandi fyri uppskot til løgtingsfíggjarlógir, eykajáttanir, uppskot til samtyktar til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini, átekningar o.tíl.

Ætlanin við hesum rundskrivi er at lætta um lóggávuarbeiðið. Í rundskrivinum eru tey rundskriv og vegleiðingar, sum áður hava verið á økinum, samlað í eitt rundskriv, soleiðis at hetta kann nýtast sum eitt uppslagsverk. Greitt verður í stuttum frá, hvørji løgfrøðilig atlit skulu havast í huga, og hvussu lógaruppskot og uppskot til kunngerðir skulu setast upp tøkniliga.

<u>Rundskrivið er býtt í 5 partar:</u>

| | |
|---|---|
| Partur I: | Uppseting av løgtingslógum og kunngerðum. |
| Partur II: | Broytingar í løgtingslógum og kunngerðum. |
| Partur III: | Felagsásetingar, so sum gildiskoma, úrgildisseting, afturvirkandi virknaður, kærureglur, gjøld, revsiásetingar, fyrisitingarlig sekt, pantiheimild og skiftisreglur. |
| Partur IV: | Uppseting av ríkislógartilmælum. |
| Partur V: | Uppseting av uppskotum til samtyktar frá landsfyrisitingini. |

# INNIHALDSYVIRLIT

## Partur I

*Uppseting av løgtingslógum og kunngerðum*


1.1. LØGTINGSLÓGARUPPSKOTIÐ ........ 8

1.1.1. SKIPAN AV INNIHALDINUM ........ 8
1.1.2. UPPSETING AV UPPSKOTINUM ........ 9
1.1.3. MÁLIÐ ........ 9
1.1.4. RÆTTSKRIVING OG TEKNSETING ........ 10
1.1.5. STYTTINGAR ........ 10
1.1.6. AT VÍSA TIL RÆTTARREGLUR ........ 11
1.1.7. SKJAL, IÐ ER PARTUR AV LØGTINGSLÓG ELLA KUNNGERÐ ........ 11
1.1.8. VERKLAGSLÓGIR ........ 12

1.2. VIÐMERKINGAR TIL LØGTINGSLÓGARUPPSKOT ........ 14

1.2.1. KAPITTUL 1. ALMENNAR VIÐMERKINGAR ........ 14
*1.2.1.1. Málið í viðmerkingunum ........ 14*
*1.2.1.2. Orsøkir til uppskotið ........ 14*
*1.2.1.3. Galdandi lóggáva ........ 14*
*1.2.1.4. Endamálið við uppskotinum ........ 14*
*1.2.1.5. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum ........ 14*
*1.2.1.6. Ummæli og ummælisskjal ........ 14*
1.2.2. KAPITTUL 2. AVLEIÐINGARNAR AV UPPSKOTINUM ........ 15
*1.2.2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur ........ 15*
*1.2.2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur ........ 15*
*1.2.2.3. Avleiðingar fyri vinnuna ........ 15*
*1.2.2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið ........ 16*
*1.2.2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum ........ 16*
*1.2.2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir ........ 16*
*1.2.2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum ........ 16*
*1.2.2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar ........ 17*
*1.2.2.9. Marknaforðingar ........ 17*
*1.2.2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv ........ 18*
*1.2.2.11. Skattir og avgjøld ........ 18*
*1.2.2.12. Gjøld ........ 18*
*1.2.2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur? ........ 19*
*1.2.2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn? ........ 19*
*1.2.2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar? ........ 19*
*1.2.2.17. Talvan (Bingoplátan) ........ 20*
1.2.3. KAPITTUL 3. SERLIGAR VIÐMERKINGAR ........ 20
*1.2.3.1. Innihaldið í tí einstøku greinini ........ 20*
*1.2.3.2. Viðmerkingar til ta einstøku greinina ........ 21*
*1.2.3.3. Er eingin viðmerking til greinina ........ 21*
1.2.4. FYLGISKJØL TIL LÓGARUPPSKOT ........ 21

1.3. UPPSETING AV LØGTINGSLÓGARUPPSKOTI ..... 22
1.3.1. WORD, SKRIFT, SKRIFTSTØDD, TABELLIR, MYNDIR OG SLÓÐIR ..... 22
1.3.2. HEITIÐ Á LØGTINGSLÓGARUPPSKOTI ..... 22
1.3.3. STYTT HEITI Á LØGTINGSLÓGARUPPSKOTI ..... 23
1.3.4. UPPSETING Í GREINIR OG STYKKIR ..... 23
1.3.5. UPPSETING Í BØKUR, PARTAR, KAPITLAR OG YVIRSKRIFTIR YVIR GREINUM ..... 24
1.3.6. UPPSETING Í NUMMAR, LITRA OG LÍTIL RÓMVERJATØL ..... 24
1.3.7. UNDIRSKRIFTIR ..... 25
1.4. UPPSETING AV KUNNGERÐAUPPSKOTI ..... 26
1.4.1. WORD, SKRIFT, SKRIFTSTØDD, TABELLIR, MYNDIR OG SLÓÐIR ..... 27
1.4.2. HEITIÐ Á KUNNGERÐAUPPSKOTI ..... 27
1.4.3. STYTT HEITI Á KUNNGERÐAUPPSKOTI ..... 28
1.4.4. INNGANGUR OG UPPSETING Í GREINIR OG STYKKIR ..... 28
1.4.5. UPPSETING Í BØKUR, PARTAR, KAPITLAR OG YVIRSKRIFTIR YVIR GREINUM ..... 28
1.4.6. UPPSETING Í NUMMAR, LITRA OG LÍTIL RÓMVERJATØL ..... 29
1.4.7. UNDIRSKRIFTIR OG FRUMRIT AT KUNNGERA ..... 30

## Partur II

*Broyting í løgtingslógum og kunngerðum*

2.1. UM BROYTINGAR Í LØGTINGSLÓGUM OG KUNNGERÐUM ..... 31
2.1.1. UM BROYTINGAR Í LØGTINGSLÓGUM ..... 31
2.1.2. UM AT ENDURNÝTA TÓMAR GREINIR ..... 31
2.1.3. SAVNINGARLÓGARUPPSKOT ..... 32
2.1.4. UM BROYTINGAR Í KUNNGERÐUM ..... 32
2.1.5. AT RÆTTA TILVÍSINGAR O.TÍL. ..... 33
2.1.6. JAVNTEKSTUR ..... 33
2.1.7. TÁ IÐ BROYTT VERÐUR Í DONSKUM TEKSTI ..... 34
2.1.8. AT SETA ÚR GILDI DANSKAN TVÍTEKST ..... 34
2.1.9. BROYTING, INNSETING OG STRIKING ..... 34
2.2. HEITI OG INNGANGUR Í BROYTINGARLØGTINGSLÓGUM ..... 35
2.2.1. HEITI Á BROYTINGARLÓGUM ..... 35
2.2.2. FRÁGREIÐANDI HEITI ..... 35
2.2.3. STYTT OG FRÁGREIÐANDI HEITI SAMANSETT ..... 35
2.2.4. INNGANGUR OG UPPSETING Í GREINIR OG STYKKI ..... 36
2.2.5. BROYTING AV HEITI ..... 38
2.2.6. INNSETING AV STYTTUM HEITI ..... 38
2.2.7. TÁ IÐ HEIMILDARÁSETING VERÐUR BROYTT ..... 38
2.3. HEITI OG INNGANGUR Í BROYTINGARKUNNGERÐUM ..... 39
2.3.1. HEITI Á BROYTINGARKUNNGERÐUM ..... 39
2.3.2. FRÁGREIÐANDI HEITI ..... 39
2.3.3. STYTT OG FRÁGREIÐANDI HEITI SAMANSETT ..... 39

2.3.4. INNGANGUR OG UPPSETING Í GREINIR OG STYKKIR ..... 40
2.3.5. BROYTING AV HEITI ..... 42
2.3.6. INNSETING AV STYTTUM HEITI ..... 42
2.3.7. BROYTING Í INNGANGINUM ..... 42
2.3.8. TÁ IÐ HEIMILDARÁSETING ER BROYTT ..... 43

2.4. BØKUR, PARTAR, KAPITLAR OG YVIRSKRIFTIR YVIR GREINUM ..... 44

2.4.1. BØKUR, PARTAR, KAPITLAR OG YVIRSKRIFTIR YVIR GREINUM ..... 44
*2.4.1.1. Broyting av bókum, pørtum og kapitlum ..... 44*
*2.4.1.2. Innseting av bókum, pørtum og kapitlum ..... 44*
*2.4.1.3. Striking av kapitlum ..... 45*
2.4.2. YVIRSKRIFTIR YVIR GREINUM ..... 45
*2.4.2.1. Broyting av yvirskriftum yvir greinum ..... 45*
*2.4.2.2. Innseting av yvirskriftum yvir greinum ..... 45*
*2.4.2.3. Striking av yvirskriftum yvir greinum ..... 45*

2.5. GREINIR, STYKKI, PUNKTUM, ORÐ, NUMMAR, LITRA OG LÍTIL RÓMVERJATØL ..... 46

2.5.1. GREINIR ..... 46
*2.5.1.1. Broyting av greinum ..... 46*
*2.5.1.2. Innseting av greinum ..... 47*
*2.5.1.3. Striking av greinum ..... 47*
*2.5.1.4. Endurnýtsla av strikaðum greinum ..... 47*
2.5.2. STYKKI ..... 48
*2.5.2.1. Broyting av stykkjum ..... 48*
*2.5.2.2. Innseting av stykkjum ..... 48*
*2.5.2.3. Striking av stykkjum ..... 50*
2.5.3. PUNKTUM ..... 50
*2.5.3.1. Broyting av punktum ..... 50*
*2.5.3.2. Innseting av punktum ..... 51*
*2.5.3.3. Striking av punktum ..... 51*
2.5.4. ORÐ ..... 52
*2.5.4.1. Broyting av orðum ..... 52*
*2.5.4.2. Innseting av orðum ..... 53*
*2.5.4.3. Striking av orðum ..... 53*
2.5.5. NUMMAR, LITRA OG LÍTIL RÓMVERJATØL ..... 53
*2.5.5.1. Broyting av nummar, litra og lítlum rómverjatølum ..... 53*
*2.5.5.2. Innseting av nummar, litra og lítlum rómverjatølum ..... 54*
*2.5.5.3. Striking av nummar, litra og lítlum rómverjatølum ..... 55*

2.6. SKJØL ..... 56

2.6.1. BROYTING Í SKJØLUM ..... 56
2.6.2. BROYTING AV FLEIRI SKJØLUM SAVNAÐ Í EINUM SKJALI ..... 56
2.6.3. INNSETING AV SKJØLUM ..... 56
2.6.4. STRIKING AV SKJØLUM ..... 57

# Partur III

*Felagsásetingar*

*Gildiskoma, úrgildisseting, afturvirkandi virknaður, kærureglur, gjøld revsiásetingar, fyrisitingarlig sekt, pantiheimild og skiftireglur*


3.1. GILDISKOMUÁSETINGAR....58

3.1.1. GILDISKOMA....58
3.1.2. TÍÐARAVMARKAÐAR ÁSETINGAR....59
3.1.3. ÚTSETING AV GILDISKOMU....60
3.1.4. SÓLSETURÁSETING....60
3.1.5. ÁSETING UM ENDURSKOÐAN....61

3.2. ÚRGILDISSETINGARREGLUR....62

3.2.1. ÚRGILDISSETING AV LØGTINGSLÓGUM....62
3.2.2. LØGTINGSLÓG VIÐ ONGUM SKIFTISREGLUM....62
3.2.3. ER TAÐ IVASAMT, NÆR UPPSKOTIÐ VERÐUR SAMTYKT, VERÐUR GJØRT SOLEIÐIS....62
3.2.4. LØGTINGSLÓG VIÐ SKIFTISREGLUM....62

3.3. AFTURVIRKANDI VIRKNAÐUR....63

3.3.1. AFTURVIRKANDI VIRKNAÐUR Í LØGTINGSLÓG....63
3.3.2. SERLIGT UM SKATT VIÐVÍKJANDI AFTURVIRKANDI VIRKNAÐI....64
3.3.3. AFTURVIRKANDI VIRKNAÐUR Í KUNNGERÐ....64

3.4. KÆRUREGLUR....65

3.4.1. KÆRUREGLUR EFTIR FYRISITINGARRÆTTINUM....65
3.4.2. KÆRUNEVNDIR O.TÍL.....65

3.5. GJØLD....66

3.5.1. SKATTIR OG AVGJØLD....66
3.5.2. GJØLD....66

3.6. REVSIÁSETINGAR....67

3.6.1. REVSIÁSETINGAR Í LØGTINGSLÓG....67
3.6.2. REVSIÁSETINGAR Í KUNNGERÐ....69
3.6.3. HEFTI SUM REVSING ER STRIKAÐ....70

3.7. FYRISITINGARLIG SEKT....71

3.8. PANTIHEIMILD....72

3.9. SKIFTISREGLUR....73

# Partur IV

*Uppseting av ríkislógartilmælum*


4.1. HVAT ER EITT RÍKISLÓGARTILMÆLI? ........ 74

4.1.1. SERSTØK RÍKISLÓG FYRI FØROYAR ........ 74
4.1.2. KONGLIG FYRISKIPAN (ANORDNING) ........ 74
4.1.3. RÍKISLÓG SUM HEVUR BEINLEIÐIS GILDI Í FØROYUM ........ 75

4.2. FORMLIG KRØV TIL INNIHALD Í RÍKISLÓGARTILMÆLUM ........ 76

4.2.1. RÍKISLÓGARTILMÆLI ........ 76
4.2.2. KUNNGERÐ VIÐ HEIMILD Í RÍKISLÓG (BEKENDTGØRELSE) ........ 77

4.3. UPPSETING AV RÍKISLÓGARTILMÆLI ........ 77

4.3.1. WORD, SKRIFT OG SKRIFTSTØDD ........ 77
4.3.2. HEITIÐ Á RÍKISLÓGARTILMÆLI VIÐ ÍGILDISSETING AV RÍKISLÓG VIÐ KONGLIGARI FYRISKIPAN (ANORDNING) ........ 78
4.3.3. HEITI Á RÍKISLÓGARTILMÆLI VIÐ ÍGILDISSETING AV SERSTAKARI RÍKISLÓG FYRI FØROYAR ........ 78
4.3.4. STYTT HEITI ........ 79
4.3.5. FRÁGREIÐANDI HEITI ........ 79
4.3.6. STYTT OG FRÁGREIÐANDI HEITI SAMANSETT ........ 79

4.4. ORÐING AV TILMÆLINUM ........ 80

4.4.1. LÓGARUPPSKOTIÐ VERÐUR LAGT VIÐ SUM SKJAL ........ 80
4.4.2. LÓGARUPPSKOTIÐ VERÐUR SKRIVAÐ INN Í RÍKISLÓGARTILMÆLIÐ ........ 81

4.5. LÓGARUPPSKOTIÐ Í EINUM RÍKISLÓGARTILMÆLI ........ 82

4.5.1. HEIMILDARÁSETINGIN Í KONGLIGARI FYRISKIPAN ........ 82
4.5.2. INNGANGUR ........ 83
*4.5.2.1. Høvuðslóg verður sett í gildi ........ 83*
*4.5.2.2. Høvuðslóg og seinni lógarbroytingar verða settar í gildi ........ 83*
*4.5.2.3. Broyting í ríkislóg fyri Føroyar ........ 84*
*4.5.2.4. Broyting í anordning ........ 84*
*4.5.2.5. Savningarlóg (broytingar í fleiri lógum í einum lógaruppskoti) ........ 85*
4.5.3. SERLIG FØROYSK VIÐURSKIFTI ........ 86
4.5.4. GILDISKOMA Í KONGLIGARI FYRISKIPAN ........ 87
4.5.5. KUNNGERÐIR GIVNAR VIÐ HEIMILD Í LÓGINI ........ 87
4.5.6. LÓGIN HEVUR TILVÍSINGAR TIL ES-REGLUR, SUM EISINI SKULU GALDA Í FØROYUM ........ 88

4.6. VIÐMERKINGAR TIL RÍKISLÓGARTILMÆLI ........ 89

4.7. SKJØL OG FYLGISKJØL (ES-LÓGGÁVA) ........ 89

# Partur V

*Uppseting av uppskotum til samtyktar frá landsfyrisitingini*


5.1. UPPSKOT TIL SAMTYKTAR FRÁ LANDSFYRISITINGINI .......... 90

5.2. UPPSETING AV UPPSKOTI TIL SAMTYKTAR .......... 90

5.3. VIÐMERKINGAR TIL UPPSKOT TIL SAMTYKTAR .......... 91

5.3.1. ORSØKIN TIL UPPSKOTIÐ .......... 91

5.3.2. LÝSING AV INNIHALDINUM Í AVTALUNI ELLA MILLUMTJÓÐASÁTTMÁLANUM .......... 91

5.3.3. AVLEIÐINGAR AV GÓÐKENNING AV AVTALU ELLA SÁTTMÁLA .......... 91

5.3.4. SKJØL ELLA FYLGISKJØL .......... 91

5.4. GÓÐKENNING AV AVTALU ELLA SÁTTMÁLA SUM PARTUR AV UPPSKOTI TIL LÓGARBROYTING .......... 92

5.5. MILLUMTJÓÐAAVTALA ELLA SÁTTMÁLI VERÐUR INNLIMAÐ SUM LØGTINGSLÓG .......... 92

GILDISKOMA AV HESUM RUNDSKRIVI .......... 93

GILDISKOMA AV HESUM RUNDSKRIVI .......... 93

SKJAL 1 .......... 94

SKJAL 2 .......... 98

# Partur I

*Uppseting av løgtingslógum og kunngerðum*

## 1.1. Løgtingslógaruppskotið

Eitt lógaruppskot skal orðast greitt, vera væl skipað og skrivað á einum lætt skiljandi máli.

Løgtingslógin vendir sær í fyrstu syftu til borgaran, sum skal kunna lesa og skilja lógina. Tað hevur eisini stóran týdning fyri viðgerðina í Løgtinginum, at tað ikki er ov torført at seta seg inn í lógaruppskotið og avleiðingar tess.

Tá ið lógin er samtykt, skulu m.a. advokatar, ákæruvald, dómarar og fyrisiting kunna nýta hana. Eitt væl og greitt orðað lógaruppskot er ein fyritreyt fyri, at tá rættarreglur seinni skulu nýtast í verki, skal ivi ikki vera um, hvat verður ásett í reglunum.

Hetta hevur stóran týdning fyri rættartrygdina.

### 1.1.1. Skipan av innihaldinum

Lógaruppskotið skal skipast soleiðis, at innihaldið er greitt og einfalt.

Hvussu lógaruppskotið verður skipað, hongur neyvt saman við innihaldinum í tí. Tað ber ikki til at gera ein leist, sum kann nýtast til øll høvi. Leisturin niðanfyri kann verða nýttur sum ein leiðbeining, men má lagast til hvørt lógaruppskot sær.

Eitt lógaruppskot kann ofta skipast á henda hátt:

1) Ásetingar um virkisøki.
2) Greining av hugtøkum.
3) Ásetingar um rættindi og skyldur hjá borgaranum.
4) Ásetingar um heimild, málsviðgerð, kærumøguleikar o.a.
5) Revsiásetingar.
6) Ásetingar um gildiskomu.
7) Úrgildissetingarreglur og skiftisreglur.
8) Ásetingar um fylgibroytingar í aðrari lóggávu.

Endamálsásetingar, ið ikki staðfesta ávís rættindi ella skyldur, men einans greiða frá tí yvirskipaða endamálinum við løgtingslógini, eiga ikki at verða skrivaðar inn í sjálva lógina. Hetta eigur heldur at verða skrivað og lýst í teimum vanligu viðmerkingunum í kapittul 1 til lógaruppskotið.

### 1.1.2. Uppseting av uppskotinum

Eitt lógaruppskot verður býtt sundur í fleiri greinir og stykki. Hetta ger, at uppskotið gerst greiðari og lættari at skilja, enn um uppskotið hevur fáar og langar greinir og stykki.

Ein grein eigur vanliga ikki at hava meira enn 3-4 stykki. Um hon hevur fleiri enn 3-4 stykki, eigur hon um gjørligt at verða býtt sundur í fleiri greinir.

Styttri lógir, tað eru lógir við færri enn 15-20 greinum, eiga ikki at verða býttar sundur í kapitlar. Heldur eiga yvirskriftir yvir greinum at verða nýttar at skipa og gera lógarbygnaðin greiðan.

Lógir við 15-20 greinum ella fleiri eiga at verða býttar sundur í kapitlar eftir evni, og hvør kapittul skal hava eitt kapittulheiti. Kapittulheitini skulu vera stutt, greið og væl umhugsað. Heitið eigur ikki vera innihaldsleyst ella einkisigandi, t.d.: innleiðandi kapittul, endaásetingar o.s.fr.

Inni í kapitli kann tað vera hóskandi at seta yvirskriftir yvir einstakar greinir ella bólkar av greinum fyri at gera lógarbygnaðin enn greiðari.

Um lógin er long, kann tað vera neyðugt at býta lógina sundur í partar og bøkur. Dømi um tílíkar lógir er rættargangslógin, revsilógin og konkurslógin.

### 1.1.3. Málið

Lógartekstir skulu vera greiðir og løgfrøðiliga neyvir. Bæði setningar, orðaval og málsnið skal verða stutt, greitt og neyvt.

Innskotnir setningar eiga ikki at verða nýttir, og høvuðsútsøgnin eigur at vera sett frammarlaga í setninginum.

Hugtøk og orðingar eiga at vera nýtt á sama hátt gjøgnum allan lógartekstin.

Hugtøk eiga at verða nýtt í sínum vanliga týdningi. Tað merkir, at hugtøk, sum ofta koma fyri í ymiskari lóggávu, skulu nýtast á sama hátt og ikki broyta týdning. Hetta er fyri at sleppa undan misskiljingum.

Fremmandaorð eiga ikki at vera nýtt, um góð og alment viðurkend føroysk orð ella heiti eru, sum hava somu merking. Orðingar og tekniskar máliskur eiga ikki at vera nýttar, uttan so, at tað er neyðugt fyri at tryggja neyðugan neyvleika ella greidleika í ásetingini.

Orð, sum eru margtýdd ella óneyðug, eiga ikki at verða nýtt. Sera long orð eiga heldur at verða umskrivað til fleiri styttri orð.

Tá lógartekstir vera týddir úr øðrum málum, eigur ikki at vera týtt orð fyri orð, tí tað ger ofta at málið verður tungt, fløkjasligt og torskilt.

Passivformar eiga at verða broyttir: "Landsstýrismaðurin velur" heldur enn at týða beinleiðis úr "valgt af ministeren".

### 1.1.4. Rættskriving og teknseting

Rættarreglur verða skrivaðar á góðum føroyskum máli.

Viðmælt verður at brúka rættskrivingarreglurnar í "Føroysk orðabók / ritstjórn: Jóhan Hendrik W. Poulsen... et al. - 1. útgáva. - Tórshavn : Føroya fróðskaparfelag, 1998." Eisini nevnd Móðurmálsorðabókin s. 1443-1453.

Hesar rættskrivingarreglur eru eisini at finna á heimasíðuni hjá Málráðnum: www.malrad.fo

Grammatiskt komma verður brúkt.

Tankastrika, skákstrika, gásareygu, klombur og semikolon eiga sum meginregla ikki at verða nýtt í rættarreglum. Er ein setningur so torgreiddur, at eitt nú tankastrika er neyðug fyri at skilja tekstin, skal setningurin heldur verða býttur sundur í fleiri setningar.

Bindistrika eigur ikki at verða nýtt, tá ið fleiri samansett orð eru um sama orðlut, t.d. "út- og innflutningur". Skriva heldur "útflutningur og innflutningur". Eitt undantak frá hesum eru almenn heiti sum eitt nú "Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya".

Verður t.d. skrivað "út- og innflutningur" við bindistriku í eina rættarreglu, finnur leitiskipanin ikki rættarregluna, um ein leitar eftir orðinum "útflutningur" á Kunngerðaportalinum og í øðrum lógadátagrunnum.

### 1.1.5. Styttingar

Styttingar eiga ikki at verða brúktar í rættarreglum. Undantiknar eru niðanfyri nevndu styttingar, sum eru at finna á styttingarlistanum á heimasíðuni hjá Málráðnum:

| | |
|---|---|
| m.a. | millum annað |
| o.a. | og annað |
| o.o. | og onnur |
| o.fl. | og fleiri |
| o.tíl. | og tilíkt |
| o.s.fr. | og so framvegis |
| o.ø. | og øðrum |
| t.d. | til dømis |

| | |
|---|---|
| t.e. | tað er |
| uml. | umleið |
| sbr. | samanber |
| sbrt. | sambært |
| viðv. | viðvíkjandi |
| viðm. | viðmerkingar |

Styttingin "v.m." eigur ikki at verða nýtt. Mælt verður til at brúka "og annað", stytt o.a.

<u>Tøkniligar styttingar:</u>
Tøkniligar og fakligar styttingar, ið eru almannakendar ella betri kendar enn fulla heitið, verða góðtiknar, serliga um orðið ella hugtakið kemur ofta fyri í einum rættarregluteksti.
Dømi: | kW | MHz | kr. | $m^2$ | sek. | ADHD | p-tal |

Verður valt at brúka stytting, eigur henda stytting at verða brúkt gjøgnum alla rættarregluna. Tað merkir, at man ikki eigur at skifta millum stytta orðið, og fulla orðið, í somu rættarreglu.

Nøvn á stovnum o.tíl. verða brúkt í styttum sniði, tá ið tað almenna navnið sæst í innganginum í tekstinum. Styttingin verður víst á hendan hátt: Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, BLF, ella Norðurlandahúsið, NLH.

### 1.1.6. At vísa til rættarreglur

Tá ið víst verður til aðrar rættarreglur, t.e. lógir, kunngerðir, o.tíl., verður bara víst til heitið á rættarregluni (ikki nummar og dagfesting):

**§ 7.** Næmingar hava sbrt. løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging, rætt til ...

Tó eigur fulla heitið á rættarregluni við nummar og dagfesting at verða skrivað í tær serligu viðmerkingarnar í kapittul 3 til lógaruppskotið.

### 1.1.7. Skjal, ið er partur av løgtingslóg ella kunngerð

Skilt verður ímillum skjal, ið er partur av sjálvari løgtingslógini ella kunngerðini, og so fylgiskjal, ið ikki er partur av løgtingslógini ella kunngerðini.

Skjal verður brúkt til tilfar, ið er trupult ella ikki hóskar seg at seta upp í eina grein. Tað kann vera oyðubløð, tekningar, myndir, tøkniligar nágreiningar ella langur uppreksandi tekstur av onkrum slag. Víst verður til skjalið í sjálvum lógartekstinum.

Skjalið er tá partur av lógartekstinum og kann einans verða broytt við nýggjari løgtingslóg ella kunngerð. Skjalið verður kunngjørt í Kunngerðablaðnum saman við løgtingslógini ella kunngerðini.

Skjalið skal hava ein greiðan bygnað og verða skipað í nummar við arabaratølum, so tað ber til at gera greiðar tilvísingar til innihaldið. Strikur, bollar, pinnar og onnur punkttekn eiga ikki at verða brúkt, tí tað er trupult at gera tilvísingar til slík tekn.

Broytingar eiga ikki at verða gjørdar í einum skjali uttan so, at broytingarnar kunnu gerast á ein neyvan og ivaleysan hátt. Um skjalið inniheldur myndir, tekningar ella stórar broytingar, verður mælt til at gera eitt nýtt skjal heldur enn at gera broytingar í skjalinum.

Skjal skal eins og annar lógartekstur verða sett upp í Word og skal standa í sama skjalið sum lógarteksturin.

Um myndir verða brúktar, skulu tær gerast í hágóðsku. Hesi myndaformat verða góðtikin: .gif, .jpg, .jpeg ella .png í RGB, men ikki í CMYK.

Ovast uppi á síðuni verður høgrasett: **Skjal og nr.**

Dømi: Anordning nr. 1139 frá 4. desember 2009 om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af straffeloven, sí tingmál nr. 140/2008.

Skjalið verður sett inn beint aftan á lógartekstin í uppskotinum og frammanfyri viðmerkingarnar til lógaruppskotið, soleiðis at raðfylgjan er hendan: lógaruppskot, skjal, viðmerkingar til lógaruppskotið, undirskrift hjá landsstýrismanni og aftast fylgiskjøl.

Uppskot til kunngerð hava ikki viðmerkingar, og tí verður skjal til kunngerð sett inn aftan á undirskriftina hjá landstýrismanninum, soleiðis at raðfylgjan er hendan: kunngerðaruppskot, undirskrift hjá landsstýrismanni og skjal. Uppskot til kunngerð hava vanliga ikki fylgiskjøl.

Sí eisini nr. 1.2.4. Fylgiskjøl til lógaruppskot.

### 1.1.8. Verklagslógir

Sambært § 4, stk. 1 í kunngerð nr. 83 frá 7. juni 2011 um løgujáttan skulu størri løguverkætlanir uppá 10 mió. kr. ella meira verða gjørdar við grundarlagi í einari verklagslóg. Løguverkætlanir, sum eru minni enn 10 mió. kr., kunnu verða gjørdar við grundarlagi í einari verklagslóg.

Ein løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði sambært § 22, stk. 1 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan. Í viðmerkingunum til løgujáttanir skal verða ein frágreiðing um tað ávísa løguarbeiðið, og upplýsingar um útreiðslurnar fyri alla verkætlanina, liðaðar á fíggjarár, sí § 22, stk. 3 í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan.

Ein verklagslóg hevur altíð eina áseting um samlaðu løguupphæddina og hevur somuleiðis altíð eina sólseturáseting, ið ásetur, nær lógin fer úr gildi. Við heimild í ásettu samlaðu løguupphæddini í verklagslógini, kann landsstýrismaðurin gera avtalur, sum hava við sær byggiútreiðslur í komandi fíggjarárum, um so er, at hetta er neyðugt fyri at gera skynsamar

sáttmálar við atliti at tí valda útbjóðingarháttinum og byggiháttinum, og treytað av, at tann samlaða løguupphæddin verður hildin, sí § 4, stk. 2 í kunngerð um løgujáttan.

At verklagslógir hava eina sólseturáseting kemst av, at tá ið byggiætlanin er framd, er støðið undir verklagslógini burtur, og hon eigur sostatt at verða sett úr gildi. Royndir vísa tó, at um sólseturáseting ikki er í lógini, verður hon verandi í gildi.

At ein verklagslóg verður verandi í gildi, er harumframt óheppið, um heimildin ongantíð verður brúkt orsakað av t.d. politiskari ósemju.

Ein sólseturáseting eigur at verða grundað á eina veruliga meting av, hvussu leingi byggiætlanin væntandi fer at vara, umframt at lagt eigur at verða upp fyri møguligum seinkingum. Í viðmerkingunum til lógina skal verða grundgivið fyri, hvussu komið er fram til setta áramálið. Eisini eigur at verða greitt frá, hvussu komið er fram til samlaðu løguupphæddina í lógini.

Dømi: Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2013 um at um- og útbyggja kringvarpshúsini í Sortudíki (tingmál nr. 149/2012) og løgtingslóg nr. 55 frá 15. mai 2014 um at byggja virkis- og umlættingardepil til børn og ung við serligum tørvi (tingmál nr. 19/2013)

Sí nr. 3.1.4. um sólseturáseting.

## 1.2. Viðmerkingar til løgtingslógaruppskot

Í Tingskipanini § 37 eru ásett minstukrøvini til løgtingslógaruppskot, sum skal leggjast fyri Løgtingið. Hetta rundskrivið ásetur fleiri krøv enn minstukrøvini í tingskipanini § 37 til tey lógaruppskot, sum landsstýrið leggur fyri Løgtingið.

Viðmerkingar til lógaruppskot eiga at verða skipaðar soleiðis:

Kapittul 1: Almennar viðmerkingar
Kapittul 2: Avleiðingarnar av uppskotinum
Kapittul 3: Serligar viðmerkingar
Fylgiskjøl

### 1.2.1. Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

#### 1.2.1.1. Málið í viðmerkingunum

Almennu viðmerkingarnar verða skrivaðar á greiðum máli og eiga at verða orðaðar á ein slíkan hátt, at fólk uttan serstakt fakligt innlit eru før fyri at skilja lógaruppskotið og avleiðingar tess.

Verða yrkisorð brúkt, skal týdningurin verða greinaður.

#### 1.2.1.2. Orsøkir til uppskotið

Í almennu viðmerkingunum verður fyrst greitt frá, hví lógaruppskotið er gjørt.

#### 1.2.1.3. Galdandi lóggáva

Greitt verður frá galdandi lóggávu. Upplýst verður, um atfinningar hava verið ella kunnu verða gjørdar ímóti galdandi lóggávu.

#### 1.2.1.4. Endamálið við uppskotinum

Greitt verður nágreiniliga frá endamálinum við uppskotinum.

#### 1.2.1.5. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Ein stuttur samandráttur verður gjørdur av nýskipanini, sum uppskotið hevur við sær. Hvat verður broytt við uppskotinum? Hvørjir fyrimunir og vansar metir landsstýrismaðurin eru við uppskotinum?

#### 1.2.1.6. Ummæli og ummælisskjal

Upplýst verður, hvørjir myndugleikar, almennir stovnar, privatir felagsskapir, áhugafeløg og onnur hava havt uppskotið til ummælis. Greitt verður í stuttum frá, hvørjar viðmerkingar

ummælispartarnir hava gjørt. Greitt verður eisini frá, hvørja støðu landsstýrismaðurin og stjórnarráðið hevur til hesar viðmerkingar. Hetta ger, at møguligar avleiðingar av lógaruppskotinum verða umhugsaðar og lýstar betur.

Eitt ummælisskjal kann eisini verða gjørt. Ummælisskjalið er ein stuttur samandráttur av innkomnu ummælunum saman við viðmerkingum hjá landsstýrismanninum til hesi. Serliga til uppskot, har nógv ummæli eru innkomin, er eitt ummælisskjal eitt hent amboð, sum gevur eitt greitt yvirlit yvir tey ummælini, sum eru komin inn.

Ummælini verða løgd við sum fylgiskjal til lógaruppskotið.

### 1.2.2. Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

#### 1.2.2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur

Hvørjar útreiðslur eru av lógaruppskotinum, og hvussu er ætlanin at fíggja útreiðslurnar av lógini:

1) Á komandi fíggjarlóg,
2) við eykajáttanarlóg,
3) ella á annan hátt.

Er lógaruppskotið ein partur av broytingum í einum samlaðum lógarverki, eigur tað eisini at verða upplýst, hvørjar tær samlaðu fíggjarligu avleiðingarnar av hesum eru.

Tað skal eisini verða tilskilað, um ongar fíggjarligar avleiðingar eru av lógaruppskotinum.

#### 1.2.2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Hvørjar umsitingarligar avleiðingar eru fyri land og kommunur? Upplýsast skal t.d. um neyðugt verður at seta á stovn ella víðka umsitingarligar eindir og um metta kostnaðin av hesum. Upplýst verður eisini, um uppskotið leggur størri byrður á verandi umsiting.

Hevur lógaruppskotið ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur, skal tað verða tilskilað.

#### 1.2.2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Hevur uppskotið fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna, skal tað verða tilskilað.

Hevur lógaruppskotið ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna, skal tað verða tilskilað.

### 1.2.2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Metast skal um avleiðingarnar á umhvørvið í breiðari merking. Hetta merkir, at metingin bæði eigur at fevna um yvirskipað og algongd umhvørvisfyrilit og náttúrufyrilit, sum taka støði í náttúrupolitikkinum, umhvørvispolitikkinum og veðurlagspolitikkinum, umframt ítøkiliga at meta um ávirkanina, tá ið talan er um tilrættaløgd inntriv.

Eru árinsmetingar gjørdar, sum kunnu setast í samband við lógaruppskotið, eiga hesar at verða endurgivnar ella lagdar við sum fylgiskjal.

Verður mett, at lógaruppskotið hevur positivar ella ongar avleiðingar fyri umhvørvið, skal tað verða tilskilað.

### 1.2.2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Her verður serliga hugsað um, um lógaruppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum. Verður t.d. stovnur fluttur, skal tað vera grundgivið fyri, hví avgjørt er at skipa økið umsitingarliga á einum ávísum stað.

Hevur lógaruppskotið ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum, skal tað verða tilskilað.

### 1.2.2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Hevur lógaruppskotið avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir t.d. sosialar avleiðingar ella aðrar avleiðingar?

Hevur lógaruppskotið ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir, skal tað verða tilskilað.

### 1.2.2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Tað eigur at verða upplýst, um tað eru millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja. Her verður serliga hugsað um sáttmálar innan fakøkini hjá stjórnarráðunum. T.d. skattaavtalur, sáttmálar innan sosiala økið, útbúgvingarøkið, umhvørvisøkið, fiskivinnuøkið og vinnuøkið o.s.fr.

Greitt skal verða frá, um bindingar til millumtjóðasáttmála gera, at uppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagbólkar ella vinnuna.

Hóast millumtjóðasáttmálar ikki eru á økinum, ella um uppskotið, hóast tílíkir sáttmálar eru, ikki fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar, skal tað verða tilskilað.

**1.2.2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

Tað eigur at verða upplýst, hvussu uppskotið samsvarar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið, og hvussu og í hvønn mun Føroyar við lógaruppskotinum halda og menna krøvini, sum eru ásett í millumtjóðasáttmála.

Í lógaruppskotinum <u>skal</u> lýsast, hvussu lógaruppskotið sampakkar við hesar tvørgangandi sáttmálarnar:

1) Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS, “Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention”. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. mai 2000.

2) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek.
   Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009 við “Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap”.

**1.2.2.9. Marknaforðingar**

Tað eigur at verða upplýst, um kendar marknaforðingar eru á økinum. Greitt verður frá, um uppskotið møguliga kann elva til marknaforðingar.

Marknaforðingar eru lógir, almennar reglur og siðvenjur, ið tarna flytføri hjá tí einstaka ella møguleikanum hjá fyritøkum at virka um landamørk í Norðurlondum.

Eitt dømi um marknaforðing er, tá ið eitt fólk arbeiðir í einum landi, men býr í einum øðrum landi, og at hetta elvir til trupulleikar. Vanligt er, at fólk rinda skatt í arbeiðslandinum og eisini eru sosialt tryggjað har. Eru skipanirnar í londunum ikki samskipaðar og taka atlit at hesum viðurskiftunum, kunnu krøv verða í lóggávu, sum gera, at viðkomandi verður noyddur at rinda til sosiala trygd í tveimum londum.

Marknaforðingar koma vanliga av, at lóggávan í londunum kring okkum ikki er samskipað. Tí eigur at vera kannað, um kendar marknaforðingar eru á økinum í markaforðingardátugrunninum:
http://www.norden.org/sv/nordiska-ministerraadet/samarbetsministrarna-mr-sam/graenshindersarbete/graenshinderdatabasen

Tað ber eisini til at seta seg í samband við skrivstovuna hjá Halló Norðurlond í Føroyum og kanna, um skrivstovan hevur vitan um marknaforðingar á økinum:
http://www.norden.org/sv/nordiska-ministerraadet/samarbetsministrarna-mr-sam/graenshindersarbete/informationstjaenster/informationstjaensten-hallaa-norden/hallaa-norden-faeroearna

Marknaforðingar eru serliga innan økini arbeiðsmarknaður og útbúgving og á sosiala økinum. Tí eigur serligt eftiransni at vera um marknaforðingar í samband við lógaruppskot á hesum økjum.

Tað eigur eisini at verða upplýst, um uppskotið kann hava við sær marknaforðingar og tarna flytføri hjá tí einstaka borgaranum ella ávirka umstøðurnar hjá fyritøkum at virka um landamørk millum Føroyar, Danmark og Grønland.

### 1.2.2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv

Hevur lógaruppskotið ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella ger lógaruppskotið onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki, eigur at verða grundgivið fyri, hví hildið verður, at inntrivið er neyðugt. Meting skal verða gjørd, um inntrivið stendur mát við lógarbrotið og við endamálið í lógini.

Verður revsiheimild ásett í løgtingslóg, ið heimilar revsiásetingar í kunngerð, skal sjálv revsiramman standa í løgtingslógini. Somuleiðis skal standa í løgtingslógini, at brot á ásetingar givnar við heimild í hesi løgtingslóg kunnu revsast. Sí nr. 3.6. um revsiásetingar.

### 1.2.2.11. Skattir og avgjøld

Skattir og avgjøld kunnu einans verða ásett, broytt og tikin av við løgtingslóg, sí § 41, stk. 1 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya.

Eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur kann áleggjast við afturvirkandi virknaði aftur um framløgudagin í Løgtinginum, sí § 41, stk. 2 í løgtingslóg um stýriskipan Føroya.

Skattir og avgjøld kunnu sostatt ikki verða ásett í kunngerð.

Eru ásetingar um skatt ella avgjøld í lógaruppskotinum, eigur tað at verða greitt frá, hvat endamálið er við skattinum ella avgjaldinum, hví mett verður, at tað er neyðugt at áleggja skattin ella avgjaldið, og hvørjar avleiðingar tað fær.

### 1.2.2.12. Gjøld

Gjald til ávíst endamál, so sum nýtslugjald, er ein samsýning fyri eina ítøkiliga tænastu ella veiting.

Gjaldið má ikki vera hægri enn útreiðslurnar, sum eru av virkseminum í samband við ta ítøkiligu tænastuna ella veitingina. Er gjaldið hægri enn hetta, er talan um ein skatt ella eitt avgjald.

Er ætlanin, at landsstýrismaðurin skal kunna áseta gjald í kunngerð, skal tað hava heimild í løgtingslógini.

Hevur lógaruppskotið ásetingar um gjøld, eigur tað at verða greitt frá, hvat endamálið er við gjaldinum, og hví tað er neyðugt.

**1.2.2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Leggur lógaruppskotið skyldur á fólk, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi, eigur at verða greitt frá teimum umsitingarligu og fíggjarligu avleiðingunum av tí. Grundgivið eigur at vera fyri, hví hetta inntrivið er neyðugt.

**1.2.2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Tá heimild verður givin einum landsstýrismanni at áseta nærri reglur, skal bara verða skrivað: "Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur...". Tað skal ikki tilskilast, hvør landsstýrismaður skal gera nærri reglur. Tað skal tí ikki verða skrivað: "Landsstýrismaðurin í vinnumálum ásetir nærri reglur...".

Orsøkin er, at stjórnarráð kunnu verða niðurløgd, og málsøki kann verða flutt frá einum landsstýrismanni til ein annan. Tá tað bara er ásett, at "landsstýrismaðurin ..." hevur heimildini, er tað altíð tann landsstýrismaður, sum til eina og hvørja tíð varðar av málsøkinum, sum hevur heimildina at áseta nærri reglur.

Leggur lógaruppskotið heimildir til ein annan landsstýrismann, ein stovn, ella leggur tað aðrar heimildir til kommunur enn tær, ið kommunurnar hava sambært kommunustýrislógini, eigur tað í viðmerkingunum at vera grundgivið fyri teimum fyrilitum, ið liggja til grund fyri hesum.

Greitt eigur eisini at verða frá, um hetta skerjir møguleikan at kæra avgerðina til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Somuleiðis eigur at verða greitt frá, hvørjar heimildir landsstýrismaðurin hevur í mun til tann, sum hevur fingið heimildir sambært lógaruppskotinum.

**1.2.2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn? Fær t.d. ein myndugleiki heimild at koma á eftirlitsvitjan í privatum heimum ella á virkjum, eigur at verða grundgivið fyri, hví tað er neyðugt. Eisini eigur nágreiniliga at verða greitt frá vavinum av heimildini.

**1.2.2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri, kann greiðast frá teimum her.

### 1.2.2.17. Talvan (Bingoplátan)

Aftan á frágreiðingina um avleiðingarnar av lógaruppskotinum verða avleiðingarnar í nr. 1.2.2.1 til og við 1.2.2.8 svaraðar við "Ja" ella "Nei" í talvuni niðanfyri.

Eru ongar avleiðingar verður svarað "Nei". Eru avleiðingar, eisini smávegis, verður svarað "Ja".

Svarast skal bara "Ja" ella "Nei". Svarast skal í allar teigar. Klombur (Ja) ella (Nei) o.tíl. eigur ikki at verða brúkt.

Talvan verður sett inn seinast í kapittul 2 um avleiðingarnar av uppskotinum.

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | | | | | |
| Umsitingarligar avleiðingar | | | | | |
| Umhvørvisligar avleiðingar | | | | | |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | | | | | |
| Sosialar avleiðingar | ///////////////////////////////////////////////// | | | | ////////////////////// |

## 1.2.3. Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 1.2.3.1. Innihaldið í tí einstøku greinini

Í serligu viðmerkingunum eigur at verða greitt frá innihaldinum í hvørjari einstakari grein. Tað eigur eisini at verða greitt frá ætlanini við greinini, og hvussu hon skal skiljast. Gott er at lýsa innihaldið við dømum.

Teksturin í greinini eigur ikki at verða endurgivin. Heldur kann íblástur fáast úr almennu viðmerkingunum. Tað er einki til hindurs fyri at endurgeva úr teimum.

Tað kann ikki lóggevast í viðmerkingunum. Tað vil siga, at ansast skal serliga væl eftir, at viðmerkingarnar ikki fara víðari enn teksturin í sjálvari greinini. Er ikki samsvar millum lógina og viðmerkingarnar, vinnur lógin vanliga á viðmerkingunum.

#### 1.2.3.2. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Viðmerkingarnar til hvørja einstaka grein eiga at innihalda hesar upplýsingar:

1) Hvørjar broytingar greinin hevur við sær í mun til galdandi rætt,
2) grundgevingina fyri broytingunum, og
3) hvørjar avleiðingar broytingarnar fáa.

#### 1.2.3.3. Er eingin viðmerking til greinina

Verður hildið, at eingin viðmerking er neyðug til eina einstaka grein, eigur tað at verða tilskilað.

### 1.2.4. Fylgiskjøl til lógaruppskot

Eitt fylgiskjal er ikki partur av lógaruppskotinum eins og eitt skjal er.

Sum fylgiskjal til eitt lógaruppskot verður vanliga lagt t.d. ummælisskrivini frá hoyrdu pørtunum ella eitt ummælisskjal. Eitt ummælisskjal er ein stuttur samandráttur av innkomnu ummælunum saman við viðmerkingunum hjá landsstýrismanninum.

Við broytingarlógum skal eisini javntekstur leggjast við lógaruppskotinum sum fylgiskjal.

Sum dømi um onnur fylgiskjøl kunnu nevnast:

1) Upprit, frágreiðingar ella álit, sum viðgera og lýsa nágreiniligari ta tillaging, sum verður gjørd við lógaruppskotiðnum.
2) Talvur við útrokningum, hagtøl, tabellir o.tíl.
3) Strikumyndir ella myndir.
4) Kanningar ella frágreiðingar um fyrisitingarliga siðvenju á økinum.
5) Størri vinnubúskaparligar ella umhvørvisligar metingar, sum hava samband við evnið í lógaruppskotinum.
6) Til ríkislógartilmæli verða vanliga viðmerkingarnar til danska lógaruppskotið lagdar við.

Endamálið við hesum fylgiskjølum er einans at lýsa lógaruppskotið betur. Tey eru ikki partur av sjálvum lógartekstinum og verða heldur ikki kunngjørd saman við lógini, tá ið hon verður kunngjørd í Kunngerðablaðnum.

Fylgiskjølini verða løgd við aftast í lógaruppskotinum. Yvirlit yvir hjáløgd fylgiskjøl eigur at verða sett aftan á undirskriftina hjá landsstýrismanninum og til vinstru á síðuni.

Um eitt skjal skal vera beinleiðis partur av lógaruppskotinum eigur at verða víst til skjalið í sjálvum lógartekstinum. Skjalið verður tá sett inn beint aftan á sjálvan lógartekstin í uppskotinum og frammanfyri viðmerkingarnar til lógaruppskotið. Sí nærri um hetta í nr. 1.1.7. Skjal, ið er partur av løgtingslóg ella kunngerð.

## 1.3. Uppseting av løgtingslógaruppskoti

### 1.3.1. Word, skrift, skriftstødd, tabellir, myndir og slóðir

Lógaruppskotið verður skrivað í Word. Skriftin skal vera Times New Roman, skriftstøddin skal vera 12 og reglugloppið skal vera 1,0. Teksturin skal vera vinstrastillaður og orðbýti skal ikki verða nýtt. Typografi funktiónin í Word skal ikki nýtast heldur. Er neyðugt at brúka tabellir og myndir, eiga hesi ikki at verða sett inn í sjálvan lógartekstin, men eiga at verða sett í eitt skjal. Slóðir til heimasíður og teldupost adressu skulu hvørki vera virknar ella undirstrikaðar.

Ovast á uppskotinum verður tilskilað:

**Løgtingið**

Dagfesting:
Mál nr.:
Málsviðgjørt:

**Løgtingsmál nr. xx/2014: Uppskot til løgtingslóg um ...**

| | |
|---|---|
| *Dagfesting:* | Dagurin, uppskotið verður sent løgtinginum. |
| *Mál nr.:* | Journal nummarið, ið stovnurin hevur givið uppskotinum. |
| *Málsviðgjørt*: | Forbókstavirnir á tí embætisfólkinum, ið hevur viðgjørt málið. |
| *Løgtingsmálsnr:* | Árstalið á løgtingsmáli fylgir tingárinum (ikki kalendaraárinum). Tingárið byrjar á ólavsøku og endar á ólavsøku fylgjandi árið. T.d. tingár 2014 er frá 29. juli 2014 til 28. juli 2015. |

### 1.3.2. Heitið á løgtingslógaruppskoti

Heitið á lógaruppskoti verður miðsett og skrivað við feitum stavum:

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**havnaloðsing**

### 1.3.3. Stytt heiti á løgtingslógaruppskoti

Fær lógin tilskilað eitt stytt heiti, verður tað sett í klombur og skrivað við feitum stavum á linjuna undir vanliga heitinum:

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**havnaloðsing**
**(Loðslógin)**

### 1.3.4. Uppseting í greinir og stykkir

Uppskotið er 2-teigað, og §-tekn og nummur eru vinstrasett á fyrstu linju við feitum stavum. "*Stk.*" verður skrivað við skákskrift.

**§ 23.** Arbeiðsinntøkan og starvssetanin skal skjalprógvast av arbeiðsgevaranum á umsóknarblað, sum ...
*Stk. 2.* Óarbeiðsføri og longdin av óarbeiðsførinum skal skjalprógvast við ...

**§ 24.** Almannastovan kann frá viðkomandi persónum, myndugleikum og feløgum, sum hava innlit í viðurskiftini, krevja upplýsingar, sum ...
*Stk. 2.* Eftir samráðingar við ...

Hevur eitt stykki fleiri nummur, verða hesi vinstrasett í hálvari klombru:

*Stk. 2.* Fyri at fáa stuðul skal umsøkjarin:
1) hava búð í Føroyum í minstalagi eitt ár,
2) ganga á eini útbúgving uttan fyri Norðurlond, og
3) vera lestrarvirkin.

### 1.3.5. Uppseting í bøkur, partar, kapitlar og yvirskriftir yvir greinum

Lógir kunnu verða býttar sundur í 4 ymiskar partar. Hesir eru bøkur, partar, kapitlar og yvirskriftir yvir greinum. Bøkur er tann størsti parturin, og verður nærum aldrin nýttur. Rættargangslógin er t.d. skild sundur í 5 bøkur. Bøkur kunnu so aftur innihalda partar, kapitlar og yvirskriftir yvir greinum.

| | |
|---|---|
| Bøkur verða nevndar: | Fyrsta bók, Onnur bók, Triðja bók ... |
| Partar verða nevndir: | Partur I, Partur II, Partur III, Partur IV ... |
| Kapitlar verða nevndir: | Kapittul 1, Kapittul 2, Kapittul 3 ... |

Hevur lógin 15-20 greinir ella fleiri, vil tað ofta vera hóskandi at býta lógina sundur í kapitlar. Eru færri enn 15-20 greinir, verður mælt til at nýta yvirskriftir yvir greinum. Yvirskriftir yvir greinum kunnu fevna um eina ella fleiri greinir.
Er uppskotið býtt sundur í bøkur, partar og kapitlar, skulu hesir vera talmerktir og hava heiti. Hevur einstaka ásetingin yvirskrift, verður hendan skrivað við skákskrift og miðsett á sjálvstøðuga reglu oman fyri § tekstin:

**Kapittul 2**
**Rætturin til dagpening**

*Orsøkir*
**§ 2.** Dagpeningur verður sambært hesari lóg veittur orsakað av óarbeiðsføri vegna ...

### 1.3.6. Uppseting í nummar, litra og lítil rómverjatøl

Skal ein grein nágreinast meiri enn í stykki, so kunnu nummar, litra og lítil rómverjatøl verða nýtt. Raðfylgjan skal altíð vera nummar, litra og lítil rómverjatøl. Fyri at kunna varðveita yvirlitið, eigur ikki at verða nágreinað ov langt niður í nummar, litra og lítil rómverjatøl. Heldur eigur at verða gjørd nýggj grein. Lítil rómverjatøl skulu einans nýtast sum undantak.

Hava nummur fleiri litra og møguliga eisini lítil rómverjatøl, verða tey sett upp á henda hátt:

1) Bólkur AM, koda 175 - lítið prutl:
   a) Fyri persónar yngri enn 18 ár: kr. 150.
   b) Fyri persónar 18 ár og eldri:
      i) Fyrsta roynd: kr 550.
      ii) Fylgjandi ástøðisroynd: kr. 300 hvørja ferð.
      iii) Fylgjandi verklig roynd: kr. 400 hvørja ferð.
      iv) O.s.fr.
2) Bólkur PM, koda 180, stórt prutl ...

Tá ið uppreksingin endar, skal antin nýggj grein ella stykki setast inn. Reglubrot við framhaldandi teksti, sum ikki er settur upp í nýggja grein ella stykki, eigur ikki at koma fyri.

Tað ber ikki til at brúka punkttekn, strikur, o.tíl.

### 1.3.7. Undirskriftir

Aftan á seinastu ásetingina verður navnið á avvarðandi landsstýrismanni miðsett og skrivað við feitum. Navnið á embætisfólki verður høgrasett. Vanliga undirskrivar aðalstjórin sum embætisfólk.

**Navn á landsstýrismanni**
landsstýrismaður

/ Navn á embætisfólki
(Starvsheitið á embætisfólki skal ikki tilskilast)

## 1.4. Uppseting av kunngerðauppskoti

Ásetingarnar í nr. 1.1.1. til og við 1.1.7. eru eisini galdandi fyri kunngerðauppskot:

Nr. 1.1.1. Skipan av innihaldinum.
Nr. 1.1.2. Uppseting av uppskotinum.
Nr. 1.1.3. Málið.
Nr. 1.1.4. Rættskriving og teknseting.
Nr. 1.1.5. Styttingar.
Nr. 1.1.6. At vísa til rættarreglur.
Nr. 1.1.7. Skjal, ið er partur av løgtingslóg ella kunngerð.

Kunngerðir hava somu støðu mótvegis borgaranum sum lógir, men kunngerðir skulu hava heimild í løgtingslóg fyri at hava rættarliga bindandi virknað. Tað merkir, at allar ásetingarnar í eini kunngerð skulu hava heimild í løgtingslóg.

Kunngerðir mugu ikki vera í andsøgn við ella vera meira víðfevndar enn heimildin í lógini.

Tess meiri víðfevnt inntrivið í kunngerðini er, tess greiðari lógarheimild krevst. Hetta er serliga galdandi fyri revsiásetingar, sum krevja heilt greiða heimild í lógini. Tað sama er galdandi fyri ásetingar við afturvirkandi virknaði og fyri heimild at áseta gjald.

Kunngerðir verða settar upp eins og løgtingslógir. Tó hava kunngerðir ein inngang, sum vísir til ásetingarnar í heimildarlógini, ið heimila kunngerðini.

Hevur lógin ásetingar, sum heimila innkrevjing av gjøldum ella heimild at áseta revsing, so skulu hesar ásetingar eisini verða nevndar í innganginum.

Tá ið ein kunngerð hevur ásetingar um gjøld og ásetingar um revsing, eigur at verða havt í huga, at hesar krevja heilt greiða lógarheimild. Ansast skal eftir, at ásetingin í kunngerðini ikki fer út um lógarheimildina. Revsing kann bara verða ásett í kunngerð, um tað er beinleiðis heimilað í lógini. Tað skal síggjast í lógini, hvat slag av revsing kann verða ásett í kunngerð.

Hevur ein kunngerð heimild í fleiri ymiskum lógum, verður tað víst til allar heimildarlógirnar í innganginum.

Hevur kunngerðin fleiri heimildarlógir, má tað viðvíkjandi ásetingum í kunngerðini um revsing og gjald serliga verða hugt eftir, hvussu revsiheimildirnar og gjaldsheimildirnar eru orðaðar í teimum ymisku heimildarlógunum.

### 1.4.1. Word, skrift, skriftstødd, tabellir, myndir og slóðir

Kunngerðauppskotið verður skrivað í Word. Skriftin skal vera Times New Roman, skriftstøddin skal vera 12 og reglugloppið skal vera 1,0. Teksturin skal vera vinstrastillaður og orðbýti skal ikki verða nýtt. Typografi funktiónin í Word skal ikki nýtast heldur. Er neyðugt at brúka tabellir og myndir, eiga hesi ikki at verða sett inn í sjálvan kunngerðatekstin, men eiga at verða sett í eitt skjal. Slóðir til heimasíður og teldupost adressu skulu hvørki vera virknar ella undirstrikaðar.

Ovast á uppskotinum verður tilskilað:

**Navn á stjórnarráði ella stovni**

Dagfesting:
Mál nr.:
Málsviðgjørt:

| | |
|---|---|
| *Dagfesting:* | Dagurin, uppskotið verður sent Lógartænastuni. |
| *Mál nr.:* | Journal nr., ið stjónarráðið ella stovnurin hevur givið uppskotinum. |
| *Málsviðgjørt*: | Forbókstavirnir á tí embætisfólkunum, ið hevur viðgjørt málið. |

### 1.4.2. Heitið á kunngerðauppskoti

Heitið á kunngerðini verður miðsett og skrivað við feitum stavum:

**Uppskot til***

**Kunngerð**
**um**
**upptøku í gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar**

* “Uppskot til” verður tilskilað, tá ið uppskotið verður sent Lógartænastuni at eftirkanna. Tá ið uppskotið er liðugt eftirkannað, og kunngerðin verður send Lógartænastuni at kunngera, verður “Uppskot til” strikað.

### 1.4.3. Stytt heiti á kunngerðauppskoti

Fær kunngerðin tilskilað eitt stytt heiti, verður tað sett í klombur og skrivað við feitum stavum á linjuna undir vanliga heitinum:

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**upptøku í gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar**
**(Upptøkukunngerðin)**

### 1.4.4. Inngangur og uppseting í greinir og stykkir

Uppskotið er 2-teigað, og greinir eru vinstrasettar á fyrstu linju við feitum stavum. ”*Stk.*” verður skrivað við skákskrift.

Í innganginum verður víst til tær lógarásetingarnar, ið heimila kunngerðini. Eisini verða skrivaðar tær broytingar, ið eru gjørdar í sjálvari lógarheimildini. Orðingin “sum broytt við ...” í innganginum til kunngerðir vísir einans til broytingar í heimildarásetingini og ikki til allar aðrar broytingar, sum eru gjørdar í lógini.

Við heimild í § 1 a, stk. 2 í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987, sum broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 30. mars 1990 og løgtingslóg nr. 131 frá 14. desember 2012, verður ásett:

**§ 1.** Frá 1. oktober 1988 gevur landsstýrið út alment kunngerðablað ...

**§ 2.** Frá 1. januar 2013 verður Kunngerðablaðið givið út ...
*Stk. 2.* Fyritreytin fyri upptøku er ...
*Stk. 3.* Útgávukervið til Kunngerðablaðið ...

### 1.4.5. Uppseting í bøkur, partar, kapitlar og yvirskriftir yvir greinum

Kunngerðir kunnu verða býttar sundur í 4 ymiskar partar. Hesir eru bøkur, partar, kapitlar og yvirskriftir yvir greinum. Bøkur og partar verða nærum ongantíð brúktar í kunngerðum, meðan kapitlar og yvirskriftir yvir greinum ofta verða brúktar.

| | |
|---|---|
| Bøkur verða nevndar: | Fyrsta bók, Onnur bók, Triðja bók ... |
| Partar verða nevndir: | Partur I, Partur II, Partur III, Partur IV ... |
| Kapitlar verða nevndir: | Kapittul 1, Kapittul 2, Kapittul 3 ... |

Hevur kunngerðin 15-20 greinir ella fleiri, er tað ofta hóskandi at býta kunngerðina sundur í kapitlar. Eru færri enn 15-20 greinir, verður tað mælt til at nýta yvirskriftir yvir greinum. Yvirskriftir yvir greinum kunnu fevna um eina ella fleiri greinir.

Er uppskotið býtt sundur í bøkur, partar og kapitlar, skulu hesir vera talmerktir og hava heiti. Verður yvirskrift nýtt, verður hendan skrivað við skákskrift og miðsett á sjálvstøðuga reglu oman fyri § tekstin:

**Kapittul 2**
**Upptøkumannagongd til 2 ára og 3 ára breytirnar**

*Umsóknarblaðið*
**§ 10.** Tá søkt verður um upptøku á breytarskipanina, verður umsóknarblað nýtt ...

### 1.4.6. Uppseting í nummar, litra og lítil rómverjatøl

Skal ein grein nágreinast meiri enn í stykki, so kunnu nummar, litra og lítil rómverjatøl verða nýtt. Raðfylgjan skal altíð vera nummar, litra og lítil rómverjatøl. Fyri at kunna varðveita yvirlitið, eigur ikki at verða nágreinað ov langt niður í nummar, litra og lítil rómverjatøl. Heldur eigur at verða gjørd nýggj grein. Lítil rómverjatøl skulu einans nýtast sum undantak.

Um nummur hava fleiri litra og møguliga eisini lítil rómverjatøl, verða tey sett upp á henda hátt:

1) Bólkur AM, koda 175 - lítið prutl:
   a) Fyri persónar yngri enn 18 ár: kr. 150.
   b) Fyri persónar 18 ár og eldri:
      i) Fyrsta roynd: kr 550.
      ii) Fylgjandi ástøðisroynd: kr. 300 hvørja ferð.
      iii) Fylgjandi verklig roynd: kr. 400 hvørja ferð.
      iv) o.s.fr.
2) Bólkur PM, koda 180, stórt prutl ...

Tá ið uppreksingin endar, skal antin nýggj grein ella stykki setast inn. Reglubrot við framhaldandi teksti, sum ikki er settur upp í nýggja grein ella stykki, eigur ikki at koma fyri.

Tað ber ikki til at brúka punkttekn, strikur, o.tíl.

### 1.4.7. Undirskriftir og frumrit at kunngera

Aftan á seinastu ásetingina verður navnið á avvarðandi stjórnarráði ella stovni og dagfesting miðsett. Navnið á landsstýrismanninum ella stovnsleiðara verður miðsett og skrivað við feitum. Navnið á embætisfólki verður høgrasett. T.e. vanliga aðalstjórin ella deildarleiðarin.

Mentamálaráðið, 27. mars 2014

**Navn á landsstýrismanni**
landsstýrismaður

/ Navn á embætisfólki
(Starvsheitið á embætisfólki skal ikki tilskilast)

Tá ið kunngerðin verður send Lógartænastuni at kunngera, skal eitt eintak verða stemplað **FRUMRIT**. Saman við frumritinum skal eisini sendast eitt nákvæmt teldutøkt eintak. Sí annars “Rundskriv um kunngering av løgtingslógum og kunngerðum o.tíl.” um mannagongdir, tá ið kunngerðir skulu undirskrivast.

# Partur II

*Broytingar í løgtingslógum og kunngerðum*

## 2.1. Um broytingar í løgtingslógum og kunngerðum

### 2.1.1. Um broytingar í løgtingslógum

Ein spurningur, ið ofta tekur seg upp, tá ið ein løgtingslóg skal broytast, er, um broytingin skal gerast sum ein lógarbroyting, ella um ein nýggj løgtingslóg skal gerast.

Snýr tað seg um avgerandi broytingar í lóggávuni, eitt nú at broyta rættarstøðuna á fleiri ella á týdningarmiklum økjum, er høvuðsreglan, at tað verður gjørt við nýggjari løgtingslóg.

Broytingar í fleiri ymiskum løgtingslógum eiga ikki at verða gjørdar í sama lógaruppskoti. Tað kann tó verða gjørt, um tað í samband við eitt lógaruppskot er neyðugt at gera fylgibroyting í fleiri øðrum lógum. Eisini kann tað verða gjørt, um sama broyting skal gerast í fleiri lógum. Sí nr. 2.1.3. um savningarlógaruppskot.

Broytingar í broytingarlógum eiga ikki at verða gjørdar. Í staðin verður gjørd ein broytingarlóg til upprunalógina, ið vísir til hinar broytingarnar, ið gjørdar eru í lógini.

Einstøku broytingarnar fáa nummar í som raðfylgju, sum tær koma fyri í upprunalógini. T.d. um heitið skal broytast, verður tað sett sum broyting nr. 1.

Tá ið broytingarlógin verður gjørd, er tað av stórum týdningi, at nýggi teksturin, ið skal setast inn í ella strikast úr lógini, verður settur í "gásareygu". Tá ið lógirnar verða samanskrivaðar, er tað bara tann teksturin og teknsetingin, ið stendur í gásareygum, ið verður settur inn ella strikaður úr upprunalógini.

### 2.1.2. Um at endurnýta tómar greinir

Er hol í nummarraðnum av greinum, tí ein grein áður er strikað, og tað er har, sum ætlanin er at seta inn nýggja grein, so kann tann nýggja greinin fáa hetta nummarið. Er t.d. § 7 fyrr strikað, og tað nú skal setast inn ein nýggj grein aftan á § 6, verður tann nýggja greinin § 7.

Hendan mannagongd má einans verða brúkt í teimum førum, har tað ikki er vandi fyri misskiljingum, t.d. tí tað í hesi ella aðrari lóggávu er víst til ta strikaðu greinina, sum ikki er konsekvensbroytt, ella t.d. um nummarið á greinini vanliga verður brúkt í fakmáli sum heiti fyri ávísum slagi av avgerðum (t.d. eitt § x-loyvi ella § 9 veiting). Vanliga eigur tað at verða nakað fráliðið, áðrenn eitt nummar á einari grein verður endurnýtt. Leiðbeinandi kann sigast, at tað skulu ganga umleið 10 ár, áðrenn nummar á grein verður endurnýtt.

### 2.1.3. Savningarlógaruppskot

Broytingar í fleiri ymiskum løgtingslógum eiga ikki at verða gjørdar í sama lógaruppskoti.

Tá ið broytingar skulu gerast í fleiri ymiskum lógum samstundis, er høvuðsreglan, at tað eigur at verða gjørt í einstøkum broytingarlógum og ikki samlað í einari broytingarlóg. Tað kann tó verða gjørt, um tað í samband við eitt lógaruppskot er neyðugt at gera fylgibroyting í fleiri øðrum lógum. Skal sama broyting gerast í fleiri lógum, t.d. broyting av myndugleikaheiti, kann tað verða gjørt í einum broytingarlógaruppskoti.

Tað sama er galdandi, um broytingin hevur sama innihaldsliga grundarlag. Tá má verða mett um, hvussu víðfevnd broytingin verður, um hon skal gerast í einari lóg, heldur enn í fleiri. Tað hevur stóran týdning, at tann samlaða broytingin ikki ávirkar gjøgnumskygni og ger lógaruppskotið ógreitt.

Dømi:

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., løgtingslóg um sjúkrahúsverkið og løgtingslóg um dagpening**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. ... frá ... um almannapensjónir o.a., sum broytt við ..., verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 3, stk. 5 verður strikað.

**2.** Í § 7, stk. 3 verður “viðbót” broytt til: “avlamisviðbót”

**§ 2**

Í løgtingslóg nr. ... frá ... um sjúkrahúsverkið, verður í § 5 “kr. 100” broytt til: “kr. 200”.

**§ 3**

Í løgtingslóg nr. ... frá ... um dagpening, sum broytt við ..., verður í § 55 “kr. 10.000” broytt til: “kr. 5.000” og “Almannastovan” broytt til: “Almannaverkið”.

**§ 4**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

### 2.1.4. Um broytingar í kunngerðum

Broyting í kunngerð verður í høvuðsheitum sett upp eins og broyting í løgtingslóg.

Broytingarkunngerðir hava ikki inngang eins og vanligar kunngerðir, har lógarheimildin verður tilskilað. Hinvegin verður í inngangingum til § 1 víst til nr., dagfesting og heitið á upprunaligu kunngerðini og allar broytingarnarkunngerðirnar, ið áður hava broytt upprunakunngerðina, verða eisini nevndar.

Kunngerðir eiga ikki at verða broyttar ov ofta. Er ein kunngerð broytt fleiri ferðir, eigur heldur ein nýggj kunngerð at verða gjørd. Tá ið talan er um grundleggjandi ella rúgvismiklar broytingar, ið skulu gerast, eigur nýggj kunngerð at verða gjørd.

Broytingar eiga ikki at verða gjørdar í fleiri ymiskum kunngerðum í somu kunngerð.

Broyting í broytingarkunngerðum eigur ikki at verða gjørd.

### 2.1.5. At rætta tilvísingar o.tíl.

Tá ið løgtingslógir og kunngerðir verða broyttar, eigur tað eisini at vera hugt eftir, um nakrar broytingar eru gjørdar, ið gera, at ásetingar í løgtingslógini ella kunngerðini ikki longur eru rættar.

Tað kann t.d. vera ein tilvísing til aðrar løgtingslógir ella kunngerðir, ið seinni hava broytt heitið, og tí verður víst til skeivt heitið. Ella kann innihald í grein verða flutt, t.d. at § 4, stk. 4 er blivin flutt til § 4, stk. 3.

Eisini kunnu stovnar hava skift navn, t.d. Toll- og Skattstova Føroya til TAKS, Vaktar- og Bjargingartænastan til Fiskiveiðieftirlitið, Bileftirlit Føroya til Akstovan o.s.fr.

Hefti sum revsing varð strikað við einari broyting í revsilógini, sum fekk gildi 1. januar 2010. Frá hesum degi er tað ikki longur møguligt at døma heftirevsing, sjálvt um ein revsiáseting í aðrari lóggávu framvegis heimilar hesum. Í staðin fyri hefti kann tá verða dømt fongsul upp til 4 mánaðir.

Í serlóggávu sum framvegis heimilar hefti sum revsing, eigur hefti at verða broytt til fongsul upp til 4 mánaðir.

Tað eigur at verða rættað, tá ið løgtingslóg ella kunngerð verður broytt.

### 2.1.6. Javntekstur

Sum fylgiskjal til lógaruppskotið eigur at verða hjálagt eitt tvey teigað yvirlit við javnteksti.

Javntekstur er eitt tvey teigað yvirlit, har fyrri teigurin vísir á galdandi orðingar av teimum greinum, ið ætlanin er at gera broytingar í, og seinni teigurin vísir á broyttu orðingarnar.

Tvey teigaða yvirlitið kann gerast við at brúka hentleikan “indsæt tabel”, ið finst í Word.

Sí dømi í skjal 2 um javntekst.

### 2.1.7. Tá ið broytt verður í donskum teksti

Tá ið broytingar skulu gerast í ein galdandi danskan tekst, skulu broytingarnar orðast á føroyskum. Einstøk føroysk orð skulu ikki setast inn í danska tekstin. Heldur eigur í minsta lagi alt stykkið ella øll greinin, ið skal broytast, at verða orðað av nýggjum.

### 2.1.8. At seta úr gildi danskan tvítekst

Áðrenn galdandi stýrisskipanarlóg kom í gildi tann 29. juli 1995 var ásett, at løgtingslógir skuldu orðast á føroyskum og donskum. Eldri løgtingslógir hava tí tvítekst.

Nýggj løgtingslóg ella broyting, sum er gjørd í einari løgtingslóg aftan á 29. juli 1995, hevur ikki longur tvítekst á donskum.

Løgfrøðiliga er nú altíð tann føroyski teksturin galdandi, um mótstríð er millum føroyska og danska tekstin.

Í teimum førum, har løgtingslóg hevur danskan tvítekst kunngjørdan í kunngerðablaðnum, verður mælt til, at stjórnarráðini ansa eftir, at tann danski teksturin verður settur úr gildi.

Tað kann verða gjørt samstundis, sum onnur lógarbroyting verður gjørd. Tá ið danski teksturin skal verða strikaður, verður tað gjørt sum sjálvstøðug lógarbroyting við orðingini: “Danski tvíteksturin í lógini verður strikaður.”

Sum dømi um hetta kann vísast til § 11 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009 um broyting í ymiskum løgtingslógum um ómyndugleika v.m.

### 2.1.9. Broyting, innseting og striking

Tá ið greinir, stykki, punktum, orð o.a. skulu broytast, kann tað verða gjørt á tríggjar hættir:

1) Galdandi ásetingar kunnu <u>broytast</u>.

2) Nýggjar ásetingar kunnu <u>setast inn</u>.

3) Galdandi ásetingar kunnu <u>strikast</u>.

Mælt verður til ikki at broyta meiri enn neyðugt í lógartekstinum. Skal bara eitt einstakt punktum broytast, er óneyðugt at broyta alla greinina. Hetta ger, at einastaka broytingin verður so gjøgnumskygd sum gjørligt.

## 2.2. Heiti og inngangur í broytingarløgtingslógum

Ásetingarnar í nr. 1.3.1. og 1.3.7. um uppseting eru eisini galdandi fyri broytingarlógir:

Nr. 1.3.1. Word, skrift, skriftstødd, tabellir, myndir og slóðir.
Nr. 1.3.7. Undirskriftir.

### 2.2.1. Heiti á broytingarlógum

Heitið á lógaruppskoti verður orðað soleiðis:

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ...**

Orðingin verður eisini brúkt, tá ið skotin verða upp fleiri broytingar í lógini.
Nummar og dagfesting á løgtingslógini, ið skal broytast, verður ikki skrivað í heitinum.
Einans fulla løgtingslógarheitið verður skrivað.

### 2.2.2. Frágreiðandi heiti

Mælt verður til at geva uppskotinum eitt frágreiðandi heiti, sum stutt og greitt lýsir, hvat broytingin snýr seg um, t.d. (Full skattskylda):

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirlønarsamansparing**
(Full skattskylda)

(Einans broytingarlógir kunnu fáa frágreiðandi heiti)

### 2.2.3. Stytt og frágreiðandi heiti samansett

Verður broytt í løgtingslóg, ið er kunngjørd við einum styttum heiti, og uppskotið fær eitt frágreiðandi heiti, verður tað sett upp soleiðis:

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirlønarsamansparing (Eftirlønarlógin)**
(Full skattskylda)

### 2.2.4. Inngangur og uppseting í greinir og stykki

Í § 1 verður tilskilað nummar, dagfesting og fulla heitið á løgtingslógini, ið skal broytast. Allar broytingarlógirnar, ið áður hava broytt upprunalógina, verða eisini nevndar.

Er ein broyting í lógini gjørd í einari lóg, sum broytir fleiri lógir (savningarlóg), eigur tann greinin, har broytingin er gjørd, at verða nevnd.

Sum dømi kann nevnast inngangurin til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tinglýsing (sum átti at verið orðaður soleiðis):

Í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 1. mai 1973, løgtingslóg nr. 37 frá 29. mai 1985, løgtingslóg nr. 39 frá 5. mai 1987, løgtingslóg nr. 59 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 164 frá 22. desember 2005, § 3 í løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006 og § 1 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

Høvuðsreglan er, at allar broytingarnar, ið áður eru gjørdar í løgtingslógini, skulu nevnast í innganginum. Er løgtingslógin broytt eina ferð áður:

Í løgtingslóg nr. ... frá ... um ..., sum broytt við løgtingslóg nr. ... frá ..., verða gjørdar hesar broytingar:

Sum undantak kann inngangurin til løgtingslóg, sum er broytt fleiri ferðir áður, 10 ferðir ella fleiri, orðast soleiðis:

Í løgtingslóg nr. ... frá ... um ..., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. ... frá ... um ..., verða gjørdar hesar broytingar:

(Hetta um vandi er fyri, at gjøgnumskygnið dettur burtur, verða allar broytingarnar settar inn í inngangin).

Viðvíkur broytingin einari broyting, ið áður er gjørd, verður víst til tey føri, har tað evnið varð broytt:

Í løgtingslóg nr. ... frá ... um ..., sum m.a. broytt við løgtingslóg nr. ... frá ..., og seinast broytt við løgtingslóg nr. ... frá ..., verða gjørdar hesar broytingar:

Orðingin “**við seinni broytingum**” eigur ikki at verða brúkt. Orsøkin er, at um tað bara stendur “við seinni broytingum”, er tað trupult at síggja, hvørjar broytingar eru gjørdar í lógini.

Uppskotið er 2-teigað, og greinir verða miðsettar á sjálvstøðuga linju oman fyri tekstin við feitum stavum. Broytingarnar verða settar í nummarrað við feitum tølum í § 1 og gildiskoman í § 2. Møguligar skiftisreglur verða settar í sjálvstøðug stykki í § 2 ella í § 3:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 95 frá 17. desember 1996 um ..., sum broytt við løgtingslóg nr. 26 frá 3. mai 1999, løgtingslóg nr. 35 frá 17. mars 2002, løgtingslóg nr. 74 frá 10. november 2005 og løgtingslóg nr. 51 frá 17. august 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 5 verður strikað.

**2.** Í § 7, stk. 2 verður “kr. 1.000” broytt til: “kr. 5000”.

**3.** § 8, stk. 3 verður orðað soleiðis: “*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta ...”

**§ 2 ***

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. mars 2011.

**§ 3**

Tey, ið byrja útbúgvingina áðrenn 1. august 2011, eru umfatað av ...

* Um § 2 hevur fleiri stykki, verður “*stk. 1.*” eisini tilskilað:

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. mars 2011.
*Stk. 2.* Tey, ið byrja útbúgvingina ...

Nummarrøð funksjónin í Word verður nýtt til at nummerera broytingarnar.

Verður bara ein einstøk broyting gjørd, er ikki neyðugt at talmerkja broytingina. Í staðin kann uppskotið verða orðað soleiðis:

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Trivnaðar- og heilsuráð**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 9 frá 5. februar 2011 um Trivnaðar- og heilsuráð verður í § 5 “2010” broytt til: “2012”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

### 2.2.5. Broyting av heiti

Heitið á einari løgtingslóg kann verða broytt, um upprunaliga heitið ikki longur lýsir innihaldið í løgtingslógini. Hetta kann t.d. vera tí, at í heitinum á løgtingslógini er navnið á almennum stovni, sum síðan hevur broytt navn, ella tí at heitið á løgtingslógini av øðrum orsøkum ikki longur verður hildið at vera nøktandi. T.d. hevur ”løgtingslóg um sjómenn” broytt heiti til ”løgtingslóg um starvsviðurskifti v.m. hjá sjófólki”.

**1.** Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

“**Løgtingslóg um starvsviðurskifti v.m. hjá sjófólki**”

### 2.2.6. Innseting av styttum heiti

Stytt heiti á einari løgtingslóg kann bara verða brúkt í t.d. broytingarlógum og aðrari lóggávu, um lógin er kunngjørd við styttum heiti. Er hetta ikki gjørt av fyrstan tíð, ber til at geva løgtingslógini stytt heiti við einari broytingarløgtingslóg. Hetta kann vera gjørt í teimum førum, har løgtingslógin vanliga verður nevnd við einum styttum heiti, uttan at tað stytta heitið er alment kunngjørt (kallinavn). Sum dømi kann nevnast, at lóg um almenna forsorg vanliga varð nevnd forsorgarlógin, hóast tað ikki var eitt alment kunngjørt heiti. Somuleiðis varð í aðrari lóggávu víst til forsorgarlógina. Tá so er, eigur løgtingslógin at verða broytt, soleiðis at stytta heitið verður sett inn í løgtingslógina og soleiðis kunngjørt.

**1.** Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:

“**(Forsorgarlógin)**”

### 2.2.7. Tá ið heimildaráseting verður broytt

Verður broyting gjørd í einari grein, ið er ein heimildaráseting, er tað neyðugt at eftirkanna, um givnar eru kunngerðir við heimild í greinini.

Stendur heimildin t.d. í § 4, stk. 4, og § 4 verður umorðað, so at heimildin eftir hetta stendur í § 4, stk. 3, so eigur inngangurin í kunngerð, givin við heimild í greinini, at verða broyttur samsvarandi. Hetta fyri at inngangurin í kunngerðini eisini framyvir vísir til røttu heimildarásetingina.

## 2.3. Heiti og inngangur í broytingarkunngerðum

Ásetingarnar í nr. 1.4.1. og 1.4.7. um uppseting eru eisini galdandi fyri broytingarkunngerðir:

Nr. 1.4.1. Word, skrift, skriftstødd, tabellir, myndir og slóðir.
Nr. 1.4.7. Undirskriftir og frumrit at kunngera.

### 2.3.1. Heiti á broytingarkunngerðum

Heitið á uppskotinum verður orðað soleiðis:

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um ...**

Nummar og dagfesting á kunngerðini, ið skal broytast, verður ikki skrivað í heitinum.

### 2.3.2. Frágreiðandi heiti

Mælt verður til at geva uppskotinum eitt frágreiðandi heiti, sum stutt og greitt lýsir, hvat broytingin snýr seg um, t.d. (Friðað øki).

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um fiskiskap eftir gulllaksi**
(Friðað øki)

(Einans broytingarkunngerðir kunnu fáa frágreiðandi heiti)

### 2.3.3. Stytt og frágreiðandi heiti samansett

Verður broytt í kunngerð, ið er kunngjørd víð einum styttum heiti, og uppskotið fær eitt frágreiðandi heiti, verður tað sett upp soleiðis:

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um fiskiskap eftir gulllaksi (Gulllaksakunngerðin)**
(Friðað øki)

### 2.3.4. Inngangur og uppseting í greinir og stykkir

Í § 1 verður tilskilað nummar, dagfesting og fulla heitið á kunngerðini, ið skal broytast. Allar broytingarkunngerðirnar, ið áður hava broytt upprunakunngerðina, verða eisini nevndar.

Høvuðsreglan er, at allar broytingarnar, ið áður eru gjørdar í kunngerðini, skulu nevnast í innganginum.

Er kunngerðin broytt eina ferð áður:

"Í kunngerð nr. ... frá ... um ..., sum broytt við kunngerð nr. ... frá ..., verða gjørdar hesar broytingar:"

Sum undantak kann inngangurin til kunngerð, sum er broytt fleiri ferðir áður, 10 ferðir ella fleiri, orðast soleiðis:

"Í kunngerð nr. ... frá ... um ..., sum seinast broytt við kunngerð nr. ... frá ... um ..., verða gjørdar hesar broytingar:"

(Hetta um vandi er fyri, at gjøgnumskygnið dettur burtur, verða allar broytingarnar settar inn í inngangin).

Orðingin "**við seinni broytingum**" eigur ikki at verða brúkt. Orsøkin er, at um tað bara stendur "við seinni broytingum" er tað trupult at síggja, hvørjar broytingar eru gjørdar í kunngerðini.

Uppskotið er 2-teigað, og greinir verða miðsettar á sjálvstøðuga linju oman fyri tekstin við feitum stavum. Broytingarnar verða settar í nummarrað við feitum tølum í § 1 og gildiskoman í § 2. Møguligar skiftisreglur verða settar í sjálvstøðugt stykki í § 2 ella í § 3:

**§ 1**

Í kunngerð nr. 7 frá 4. mars 2014 um skipan av fiskiskapinum eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2014, sum broytt við kunngerð nr. 15 frá 27. mars 2014, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
“Fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verður fyri 2014 ásett ein heildarkvota á 211.449 tons av svartkjafti.”

**2.** Í § 6 verður sum stk. 3 sett:
“*Stk. 3.* Tá fiskað verður í norskum sjógvi, skal fiskifarið halda seg til tær reglur, sum galda fyri fiskiskap eftir svartkjafti fyri skip undir føroyskum flaggi í norskum sjógvi.”

**§ 2 ***

Henda kunngerð kemur í gildi 1. mars 2011.

**§ 3**

Skip, ið eru farin undir fiskiskap áðrenn 1. august 2011, eru umfatað av ...

* Hevur § 2 fleiri stykki, verður “*stk. 1.*” eisini tilskilað:

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda kunngerð kemur í gildi 1. mars 2011.
*Stk. 2.* Tey, ið fiska svartkjaft ...

Nummarrøð funktiónin í Word skal verða nýtt til at talmerkja broytingarnar.

Verður bara ein einstøk broyting gjørd, er ikki neyðugt at talmerkja broytingina. Í staðin kann uppskotið verða orðað soleiðis:

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um Trivnaðar- og heilsuráð**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 9 frá 5. februar 2011 um Trivnaðar- og heilsuráð verður í § 5 “2010” broytt til: “2012”.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

### 2.3.5. Broyting av heiti

Heitið á einari kunngerð kann við tíðini vísa seg ikki longur at lýsa innihaldið í kunngerðini. Eitt hugsað dømi kundi verið, at "Kunngerð um grindadráp og grindarakstur" broytti heiti til "Kunngerð um grind".

**1.** Heitið á kunngerðini verður orðað soleiðis:

"**Kunngerð um grind**"

### 2.3.6. Innseting av styttum heiti

Stytt heiti á einari kunngerð kann bara verða brúkt í t.d. broytingarkunngerðum og aðrari lóggávu, um kunngerðin er kunngjørd við styttum heiti. Er tað ikki gjørt av fyrstan tíð, ber til at geva kunngerðini stytt heiti við einari broytingarkunngerð. Hetta kann verða gjørt í teimum førum, har kunngerðin vanliga verður nevnd við einum styttum heiti, uttan at hetta stytta heitið er alment kunngjørt (kallinavn). Tá so er, eigur kunngerðin at verða broytt, soleiðis at stytta heitið verður sett inn í kunngerðina og soleiðis kunngjørt.

**1.** Sum stytt heiti á kunngerðini verður sett:

"**(Próvtalskunngerðin)**"

### 2.3.7. Broyting í innganginum

**1.** Inngangurin verður orðaður soleiðis:
"Við heimild í § 17, stk. 2 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mars 2002 ..."

### 2.3.8. Tá ið heimildaráseting er broytt

Eru kunngerðir givnar við heimild í einari grein, sum verður broytt, so skal fylgibroyting gerast í innganginum í kunngerðini.

Dømi: Kunngerð nr. 21 frá 3. apríl 2013

**Kunngerð um broyting í kunngerð um stuðul til hoyritól**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 96 frá 18. november 2008 um stuðul til hoyritól, sum broytt við kunngerð nr. 116 frá 14. desember 2010, verður inngangurin orðaður soleiðis:

"Við heimild í §§ 18 c, stk. 6 og 33, stk. 4 og 6 í lov for Færøerne om offentlig forsorg, sbrt. lovbekendtgørelse nr. 100 af 2. marts 1988, sum broytt við løgtingslóg nr. 169 frá 23. desember 2011 verður ásett:"

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## 2.4. Bøkur, partar, kapitlar og yvirskriftir yvir greinum

Niðanfyristandandi er galdandi fyri bæði løgtingslógir og kunngerðir.

### 2.4.1. Bøkur, partar, kapitlar og yvirskriftir yvir greinum

Broytingar í bókum, pørtum, kapitlum og yvirskriftum yvir greinum verða gjørdar á sama hátt bæði í løgtingslógum og kunngerðum.

Skulu stórar broytingar gerast í einum kapitli, verður mælt til at orða broytingina sum eina einstaka broyting, t.e. sum eina nýggja orðing av øllum kapitlinum.

#### 2.4.1.1. Broyting av bókum, pørtum og kapitlum

Broytingarnar í bókum, pørtum og kapitlum verða gjørdar á sama hátt.

Heiti á kapitli verður broytt soleiðis:

**1.** Heitið á kapitli 1 verður orðað soleiðis:

**"Veðrar í Føroyum"**

#### 2.4.1.2. Innseting av bókum, pørtum og kapitlum

Raðfylgjan av bókum, pørtum og kapitlum skal ikki broytast. Skal ein nýggjur kapittul setast millum tveir kapitlar, fær nýggi kapitulin ein bókstav eftir kapittulnummarið, t.d. Kapittul 2 a, o.s.fr.

Skal ein nýggjur kapittul setast inn í rættarreglu, verður tilskilað, hvar nýggi kapittulin skal setast inn. Niðanfyri er eitt dømi, har nýggjur kapittul verður settur inn aftan á § 30, sum er síðsta grein í kapitli 5.

Tá ið kapittul verður settur inn millum aðrar kapitlar:

**1.** Aftan á § 30 verður sum kapittul 5 a sett:

**"Kapittul 5 a**
**Elektronisk tollavgreiðsla**

**§ 30 a.** Landsstýrismaðurin kann loyva elektroniskari tollavgreiðslu.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann við kunngerð áseta nærri reglur um ..."

Tá ið kapittul verður settur inn sum seinasti kapittul:

**2.** Aftan á § 66 verður sum kapittul 6 sett:

“**Kapittul 6**
**Tollvirðið**”

**2.4.1.3. Striking av kapitlum**

Tá ið heilur kapittul við øllum heitum, yvirskriftum yvir greinum og øllum innihaldi skal verða strikaður, verður skrivað:

**1.** Kapittul 3 verður strikaður.

Skal bara kapittulnummar og kapittulheitið verða strikað, verður skrivað:

**2.** Aftan á § 66 verður kapittulnummar “Kapittul 6” og kapittulheitið “Tollvirðið” strikað.

**2.4.2. Yvirskriftir yvir greinum**

**2.4.2.1. Broyting av yvirskriftum yvir greinum**

**1.** Yvirskriftin yvir § 3 verður orðað soleiðis:

“*Veðrasløg*”

**2.4.2.2. Innseting av yvirskriftum yvir greinum**

**1.** Sum yvirskrift yvir § 3 verður sett:

“*Veðrasløg*”

**2.4.2.3. Striking av yvirskriftum yvir greinum**

**1.** Yvirskriftin yvir § 3 verður strikað.

## 2.5. Greinir, stykki, punktum, orð, nummar, litra og lítil rómverjatøl

Niðanfyristandandi er galdandi fyri bæði løgtingslógir og kunngerðir.

Mælt verður til ikki at broyta meiri enn neyðugt í lógartekstinum. Verður bara eitt einstakt punktum broytt, so eigur bara hetta punktum at verða broytt, ikki øll greinin. Hetta ger, at einstaka broytingin verður so gjøgnumskygd sum gjørligt.

Verður størri broyting gjørd í grein, ella fleiri samanhangandi greinum, verður tó mælt til at gera hesar broytingar sum eina broyting, tvs. sum eina nýggja orðing av allari greinini ella øllum greinunum. Sí nr. 2.1.1. um broytingar í løgtingslógum.

Skulu fleiri broytingar gerast í einari grein, verða broytingarnar gjørdar sum sjálvstøðugar broytingar, uttan so at tær viðvíkja tí sama ella eru framhald av teirri fyrru broytingini.

Einstøku broytingarnar verða settar í somu raðfylgju sum tær greinir, ið skulu broytast. Ein broyting í § 2 verður sett frammanfyri t.d. broyting í § 4 o.s.fr.

### 2.5.1. Greinir

#### 2.5.1.1. Broyting av greinum

Heilar greinir verða broyttar soleiðis:

**1.** § 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 1.** Loyvi til veðrahald kann verða játtað eftir umsókn.
*Stk. 2.* Fyri loyvi kann landsstýrismaðurin ...
*Stk. 3.* Brot á ásetingar í loyvi ..."

Hevur greinin bara eitt stykki, verður hon broytt soleiðis:

**1.** § 1 verður orðað soleiðis:

"**§ 1.** Loyvi til veðrahald kann verða játtað ..."

Hevur greinin fleiri stykki, og bara stk. 1 skal broytast, verður hetta gjørt sum í hesum døminum:

**1.** § 15, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Løgtingsmenn verða valdir fyri 4 ár í senn."

Hevur greinin t.d. 3 stykki, og stk. 1 og 2 skulu broytast, verður hetta gjørt sum í hesum døminum:

**1.** § 15, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:
"Løgtingsmenn verða valdir fyri 4 ár í senn.
*Stk. 2.* Valbæri hevur hvør tann sum ..."

§ 15 verður ikki skrivað í broytingartekstin, tí tað kann skiljast sum nýggj orðing av allari § 15.

### 2.5.1.2. Innseting av greinum

Raðfylgjan av greinum verður ikki broytt. Verður ein grein sett inn í eina samanhangandi røð av greinum í einari løgtingslóg, t.d. aftan á § 29, verður greinin nevnd **§ 29 a**, **§ 29 b**, o.s.fr.

Tá ið grein verður sett inn millum aðrar greinir:

**1.** Aftan á § 29 verður sett:

"**§ 29 a.** Embætisfólk skulu ..."

Tá ið grein verður sett seinast í einum kapitli:

**2.** Aftan á § 42 verður í kapittul 5 sett:

"**§ 42 a.** Embætisfólk skulu ..."

### 2.5.1.3. Striking av greinum

Tá ið greinir verða strikaðar, kemur viðkomandi grein at standa tóm. Hinar greinirnar flyta ikki raðfylgju.

**1.** § 4 verður strikað.

**2.** §§ 4-8 verða strikaðar.

**3.** §§ 4 og 5, stk. 5 (*red:* sum er seinasta stykki í § 5) verða strikaðar.

**4.** §§ 4, 6 og 8 verða strikaðar.

**5.** §§ 4-8 og 10 verða strikaðar.

### 2.5.1.4. Endurnýtsla av strikaðum greinum

Sí nr. 2.1.2. um at endurnýta tómar greinir.

### 2.5.2. Stykki

#### 2.5.2.1. Broyting av stykkjum

1. § 10, stk. 1 verður orðað soleiðis:
   "Súrhoyggj skal goymast myrkt og kalt."

2. § 10, stk. 2 verður orðað soleiðis:
   "*Stk. 2.* Fóður og gras skal ..."

3. § 10, stk. 2 og 3 verða orðað soleiðis:
   "*Stk. 2.* Fóður og gras skal ...
   *Stk. 3.* Fóður skal innihalda minst ..."

#### 2.5.2.2. Innseting av stykkjum

Stykki flyta sum høvuðsregla raðfylgju. Hetta skal verða nevnt í broytingini. Verður tað ikki nevnt í broytingini, at stykki flytur raðfylgju, flytur stykki ikki raðfylgju. Tá kemur hol at vera í raðfylgjuni. Sí nr. 2.5.2.3. um striking av stykkjum.

Tað skal greitt ganga fram, um nýggja stykkið kemur í staðin fyri ella afturat galdandi teksti. Tað er t.d. tvískilt at skriva: "Í § 2 verður sum nýtt stk. 3 sett: ..." um tað frammanundan er eitt stk. 3, sum framvegis skal vera í gildi.

Hevur greinin fleiri stykki og nýggja stykkið verður sett inn ímillum verandi stykki, verður fyrst skrivað "aftan á" tað stykkið har innsetast skal, og síðani verður orðingin "sum nýtt stk. sett:" brúkt:

Stykki kemur inn millum tvey verandi stykki:

1. Í § 2 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
   "*Stk. 3.* Fóður og gras skal ..."
   Stk. 3 og 4 verða eftir hetta stk. 4 og 5.

Fleiri stykki koma inn millum tvey verandi stykki:

2. Í § 2 verður aftan á stk. 2 sum nýggj stk. sett:
   "*Stk. 3.* Fóður og gras skal ...
   *Stk. 4.* Fóður skal innihalda minst ..."
   Stk. 3 og 4 verða eftir hetta stk. 5 og 6.

Minnist til, at punktum skal setast innanfyri gásareyguni.

Eru bara tvey stykki í § 2 og stykki 3 kemur afturat, verður hendan orðingin "sum stk. 3 sett:" brúkt:

Stykki verður sett sum seinasta stykki:

**1.** Í § 2 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 3.* Fóður og gras skal ..."

Verða fleiri samanhangandi nýggj stykki sett inn í eina grein, verður mælt til at gera hetta sum eina samlaða broyting:

Fleiri stykki verða sett sum seinastu stykki:

**1.** Í § 10 verða sum stk. 2, 3 og 4 sett:
"*Stk. 2.* Fóður og gras skal ...
*Stk. 3.* Fóður skal innihalda minst ...
*Stk. 4.* Grasið má ikki vera ..."

Skulu tvey stykki gerast til eitt stykki, um t.d. stk. 2 og 3 skulu leggjast saman til stk. 2, verður gjørt soleiðis:

Tvey stykki verða løgd saman í eitt stykki:

**1.** § 20, stk. 2 og 3 verða strikað, og í staðin verður sett:
"*Stk. 2.* ..."
Stk. 4-6 verða eftir hetta stk. 3-5.

Skal eitt stykki gerast til tvey stykki, um t.d. stk. 1 skal deilast til stk. 1 og 2, verður gjørt soleiðis:

Eitt stykki verður deilt í tvey stykki:

**1.** § 25, stk. 1 verður strikað, og í staðin verður sett:
"Millum ...
*Stk. 2.* ..."
Stk. 2-6 verða eftir hetta stk. 3-7.

### 2.5.2.3. Striking av stykkjum

Tað er týdningarmikið at taka støðu til, um eitt stykki skal standa tómt, ella um onnur stykki skulu flyta raðfylgju, tá ið eitt stykki verður strikað. Høvuðsreglan er, at stykki flyta raðfylgju.

Eitt undantak frá høvuðsregluni kann vera, um stykkið er ein heimildaráseting. Um t.d. stk. 4 er heimild fyri einari kunngerð, og stk. 3 verður strikað, so eigur stk. 4 ikki at flyta, og tá kemur stk. 3 at standa tómt.

Verður stk. 4 tá flutt, skal inngangurin í kunngerðini eisini broytast, sí nr. 2.3.7. um broyting í innganginum.

<ins>Stykki verður strikað og onnur stykki flyta pláss samsvarandi:</ins>

**1.** Í § 10 verður stk. 3 strikað.
Stk. 4-9. verða eftir hetta stk. 3-8.

<ins>Stykki verður strikað og onnur stykki flyta **ikki** pláss:</ins>

**1.** Í § 10 verður stk. 3 strikað.

<ins>Stykki verður strikað, onnur stykki flyta pláss samsvarandi og orð verður strikað úr stykki:</ins>

**1.** Í § 10 verður stk. 2 strikað, og í stk. 3, sum verður stk. 2, verður orðið “øki” strikað.

### 2.5.3. Punktum

Punktum kunnu verða broytt í greinum, í skjølum o.s.fr.

Punktum verða nevnd “pkt.”

### 2.5.3.1. Broyting av punktum

Skal eitt punktum umorðast verður hendan orðingin brúkt:

**1.** Í § 10, stk. 2 verður 4. pkt. orðað soleiðis:
“Ikki er loyvt at nýta ...”

### 2.5.3.2. Innseting av punktum

Verður punktum sett inn millum tvey punktum, verður tað ikki nevnt, at seinna punktum skiftir pláss í raðfylgjuni. Punktum skifta sjálvvirkandi pláss í raðfylgjuni. Hetta er tí at punktum hava ikki nummar.

Tað skal nágreiniliga verða ásett, hvar punktum skal setast.

Verður nýtt punktum sett inn ímillum verandi punktum ella aftast, verður fyrst skrivað "aftan á" tað punktum har innsetast skal, og síðani verður orðingin "verður sum nýtt pkt. sett:" brúkt:

1. **1.** Í § 45, stk. 1 verður aftan á 1. pkt sum nýtt pkt. sett:
   "Undantøk viðvíkjandi próvtøku kunnu verða gjørd."

2. **2.** Í § 45, stk. 1 verður aftan á 1. pkt sum nýtt 2. og 3. pkt. sett:
   "Undantøk viðvíkjandi próvtøku kunnu verða gjørd. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, nær undantøk kunnu gerast."

Skal eitt nýtt 1. pkt. setast inn frammanfyri verandi 1. pkt., verður hendan orðingin brúkt:

1. Í § 45, stk. 1 verður sum nýtt 1. pkt. sett:
   "Próvtøkur verða hildnar við endan av hvørjum hálvári."

Minnist til, at punktum skal setast innanfyri gásareyguni.

Tað er ikki longur gjørligt, at seta punktum inn í staðin fyri verandi punktum. Um punktum skal broyta innihald verður orðingin í nr. 2.5.3.1. um broytingar av punktum nýtt.

### 2.5.3.3. Striking av punktum

Verður eitt punktum strikað, verða hini punktum flutt sjálvvirkandi, uttan at tað verður nevnt. Tað skal ikki nevnast, at punktum flyta pláss, sum tað verður gjørt tá stykki, nummar, litra ella lítil rómverjatøl flyta pláss.

1. Í § 10, stk. 2 verður 4. pkt. strikað.
2. Í § 10, stk. 2 verður 4. og 5. pkt. strikað.
3. Í § 37, stk. 1, verður 1. pkt. strikað.

### 2.5.4. Orð

Einstøk orð ella nøkur samanhangandi orð kunnu verða broytt í rættarregluni, eitt nú í heitinum, í innganginum, í greinum, í skjølum o.s.fr.

#### 2.5.4.1. Broyting av orðum

Tá ið orð verða broytt, skal eisini verða hugsað um teknseting, t.d. um nýggja orðið skal hava komma frammanfyri ella aftanfyri. Setningurin skal verða fullfíggjaður við teknseting o.s.fr., eftir at broytingin er gjørd.

**1.** Í § 10, stk. 2 verður "2014" broytt til: "2015".

**2.** Í § 11, stk. 3 verður "2014" broytt til: "2015 og 2016".

**3.** Í § 12, stk. 5 verður "longa" broytt til: "longa og svartkalvi".

Verður eitt einstakt orð ella hugtak broytt á sama hátt í fleiri greinum, verða broytingarnar savnaðar undir einum nummari við ta greinina, har orðið kemur fyri fyrstu ferð:

**1.** Í § 60, stk. 1, 1. pkt. og tvær staðni í § 62, stk. 3 verður "landsstýrið" broytt til: "landsstýrismaðurin".

Tað ber **ikki** til at skriva:

**1.** "Landsstýrið" í øllum bendingum og vendingum skal broytast til: "Landsstýrismaður".

**2.** Allastaðni og í øllum bendingum, skal "landsstýrið" broytast til: "landsstýrismaður".

Orsøkin til at slíkar orðingar ikki kunnu brúkast, er, at orðið verður ikki bent á sama hátt allastaðni. Eisini kemur tað fyri, at orðið onkustaðni skal byrja við stórum bókstavi, og aðrastaðni skal byrja við lítlum bókstavi.

#### 2.5.4.2. Innseting av orðum

Tá ið orð verða sett inn, skal eisini verða hugsað um teknseting, t.d. um innsetta orðið ella orðini skulu hava komma frammanfyri ella aftanfyri. Setningurin skal verða fullfíggjaður við teknseting o.s.fr., eftir at broytingin er gjørd.

1. Í § 10, stk. 2 verður aftan á "fóður" sett: "og gras".
2. Í § 12, stk. 3 verður aftan á "fóður" sett: ", gras og hoyggj".
3. Í § 14, stk. 4 verður aftan á "fóður" sett: ", gras, hoyggj,".

#### 2.5.4.3. Striking av orðum

Tá ið orð verða strikað, skal eisini verða hugsað um teknseting, t.d. um okkurt komma skal strikast eisini. Setningurin skal verða fullfíggjaður við teknseting o.s.fr., eftir at broytingin er gjørd.

1. Í § 10, stk. 2 verður "2014," strikað.

### 2.5.5. Nummar, litra og lítil rómverjatøl

Lógartøkniliga er tað sama galdandi fyri nummar, litra og lítil rómverjatøl, sum fyri stykki.

Verða hesi broytt, tí at nýggj nummar, litra ella lítil rómverjatøl verða sett inn ella verða strikað, verður lagt upp fyri hesum í broytingini á hendan hátt: "Nr. 2 og 3 verða eftir hetta nr. 3 og 4." o.s.fr.

#### 2.5.5.1. Broyting av nummar, litra og lítlum rómverjatølum

1. § 10, stk. 2, nr. 3 verður orðað soleiðis:
   "3) Skeið í veðrahaldi ..."
2. § 10, stk. 2, nr. 3, litra a verður orðað soleiðis:
   "a) Skeið í veðrahaldi ..."
3. § 10, stk. 2, nr. 3, litra a, lítið rómverjatal iii verður orðað soleiðis:
   "iii) Skeið í veðrahaldi ..."

### 2.5.5.2. Innseting av nummar, litra og lítlum rómverjatølum

Nummar verður sett afturat (aftast):

**1.** Í § 30, stk. 2 verður sum nr. 4 sett:
“4) Skeið í veðrahaldi ...”

**2.** Í § 31, stk. 2 verða sum nr. 2, 3 og 4 sett:
“2) Skeið í veðrahaldi ...
3) Luttaka kann hvør tann, ið ...
4) Fyri luttøku verður goldið ...”

Nummar kemur inn ímillum tvey nummar:

**3.** Í § 31, stk. 2 verður aftan á nr. 2 sum nýtt nr. sett:
“3) Luttaka kann einhvør, ið ...”
Nr. 3 og 4 verða eftir hetta nr. 4 og 5.

---

Litra verður sett afturat (aftast):

**1.** Í § 30, stk. 2, nr. 4 verður sum litra d sett:
“d) Skeið í veðrahaldi ...”

**2.** Í § 31, stk. 2, nr. 4 verða sum litra b, c og d sett:
“b) Skeið í veðrahaldi ...
c) Luttaka kann hvør tann, ið ...
d) Fyri luttøku verður goldið ...”

Litra kemur inn ímillum tvey litra:

**3.** Í § 31, stk. 2, nr. 3 verður aftan á litra b sum nýtt litra sett:
“c) Skeið í veðrahaldi ...”
Litra c og d verða eftir hetta litra d og e.

Lítil rómverjatal verður sett afturat (aftast):

1. Í § 30, stk. 2, nr. 4, litra b verður sum lítið rómverjatal iii sett:
   “iii) Skeið í veðrahaldi ...”

2. Í § 31, stk. 2, nr. 4, litra b verða sum lítil rómverjatøl ii, iii, iv og v sett:
   “ii) Skeið í veðrahaldi ...
   iii) Luttaka kann hvør tann ið ...
   iv) Fyri luttøku verður goldið ...
   v) O.s.fr.”

Lítið rómverjatal kemur inn ímillum tvey lítil rómverjatøl:

3. Í § 31, stk. 2, nr. 3, litra c verður aftan á lítið rómverjatal ii sum nýtt lítið rómverjatal sett:
   “iii) Fyri luttøku verður goldið...”
   Lítil rómverjatøl iii og iv verða eftir hetta lítil rómverjatøl iv og v.

### 2.5.5.3. Striking av nummar, litra og lítlum rómverjatølum

1. Í § 31, stk. 3 verður nr. 3 strikað.
   Nr. 4 verður eftir hetta nr. 3.

2. Í § 31, stk. 3, nr. 3 verður litra b strikað.
   Litra c verður eftir hetta litra b.

3. Í § 31, stk. 3, nr. 3, litra b verður lítið rómverjatal iii strikað.
   Lítið rómverjatal iv verður eftir hetta lítið rómverjatal iii.

## 2.6. Skjøl

Skilt verður ímillum skjøl, ið eru partur av sjálvari løgtingslógini ella kunngerðini, og fylgiskjøl, ið ikki eru partur av løgtingslógini ella kunngerðini. Sí nr. 1.1.7. um skjal, ið er partur av løgtingslóg ella kunngerð.

### 2.6.1. Broyting í skjølum

Tá ið eitt skjal verður dagført ella kemur í staðin fyri eitt verandi skjal, verður tað gjørt við orðingini:

1. Skjal 3 til løgtingslóg nr. ... frá ... um ... verður orðað sum ásett í skjali 1.
2. Skjal 3 til kunngerð nr. ... frá ... um ... verður orðað sum ásett í skjali 1.

"Skjal 1" í døminum er eitt skjal til eina broytingarlóg ella broytingarkunngerð, har ein broyting er at orða skjal 3 í høvuðslógini ella høvuðskunngerðini av nýggjum.

### 2.6.2. Broyting av fleiri skjølum savnað í einum skjali

Hevur ein løgtingslóg ella kunngerð nógv skjøl og smærri broytingar skulu gerast í fleiri skjølum, verður tað gjørt soleiðis:

1. Í skjali 2, 4 og 7 til løgtingslóg nr. ... frá ... um ... verða hesar broytingar gjørdar:
   Sí broytingarnar í hjálagda skjali 1 til hesa løgtingslóg.
2. Í skjali 2, 4 og 7 til kunngerð nr. ... frá ... um ... verða hesar broytingar gjørdar:
   Sí broytingarnar í hjálagda skjali 1 til hesa kunngerð.

### 2.6.3. Innseting av skjølum

Tá ið eitt nýtt skjal verður sett inn, verður tað sett aftast í raðfylgjuna av skjølum. Skjalið skal hava nummar. Í løgtingslóg ella kunngerð verður tað gjørt við orðingini:

1. Skjal 1 verður sett sum skjal 3 til løgtingslóg nr. ... frá ... um ...
2. Skjal 1 verður sett sum skjal 3 til kunngerð nr. ... frá ... um ...

"Skjal 1" í døminum er eitt skjal til eina broytingarlóg ella broytingarkunngerð, har ein broyting er at seta eitt skjal afturat inn í lógina ella kunngerðina. Nýggja skjalið verður nr. 3 ("Skjal 3") í høvuðslógini ella høvuðskunngerðini, sum frammanundan hevur 2 skjøl.

Skal skjalið koma ímillum tvey skjøl, fær nýggja skjalið bókstav eftir seg, t.d. Skjal 2 A, Skjal 2 B, Skjal 2 C, o.s.fr.

1. Skjal 1 verður sett sum skjal 3 A til løgtingslóg nr. ... frá ... um ...
2. Skjal 1 verður sett sum skjal 3 A til kunngerð nr. ... frá ... um ...

Í hesum døminum hevur lógin ella kunngerðin minst 4 skjøl frammanundan

**2.6.4. Striking av skjølum**
Tá ið skjøl verða strikað, flyta hini skjølini ikki raðfylgju.

1. Skjal 1 verður strikað.
2. Skjal 1-9 verða strikað.

Dømi um at broyting er gjørd í kunngerð og í skjali í somu broytingarkunngerð er kunngerð nr. 93 frá 11. september 2012 um broyting í kunngerð um koyrikort og koyrifrálæru.

# Partur III

## *Felagsásetingar*

### *Gildiskoma, úrgildisseting, afturvirkandi virknaður, kærureglur, gjøld, revsiásetingar, fyrisitingarlig sekt, pantiheimild og skiftisreglur*

## 3.1. Gildiskomuásetingar

### 3.1.1. Gildiskoma

Gildiskoma ásetur, nær løgtingslógin ella kunngerðin kemur í gildi. Mest vanligt er at nýta orðingina: “Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.” Kunngjørt verður vanliga fríggjadagar. Flestu løgtingslógir og kunngerðir koma tí í gildi beint eftir midnátt fríggjakvøld.

> **Uppskot til**
>
> **Løgtingslóg**
> **um**
> **veðrahald**
>
> *Gildiskoma*
> **§ 10.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Hevur gildiskomuásetingin ella skiftisregluásetingin í einari broytingarlóg ella broytingarkunngerð fleiri stykki, verður “*stk. 1*” eisini tilskilað í greinini:

> **Uppskot til**
>
> **Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ...**
>
> **§ 1**
>
> Í løgtingslóg nr. ... frá ... um ..., sum broytt við ..., verða gjørdar hesar broytingar:
>
> **1.** ...
>
> **2.** ...
>
> **§ 2**
>
> *Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
> *Stk. 2.* Tey, ið byrja útbúgvingina áðrenn 1. august 2011, eru fevnd av ...

### 3.1.2. Tíðaravmarkaðar ásetingar

Tíðaravmarkaðar ásetingar verða nýttar, tá ið ávísar ásetingar í løgtingslóg ella kunngerð bara skulu hava gildi eitt ávíst tíðarskeið, t.d. eina ávísa árstíð. Tá ið ásetta tíðarskeiðið er farið, er løgtingslógin ella kunngerðin framvegis í gildi, men innihaldsliga hevur løgtingslógin ella kunngerðin ikki longur virknað.

Hetta verður t.d. nýtt í lóggávu innan fiskivinnuna, har ávísur fiskiskapur verður ásettur fyri serstaka árstíð ella ár. Nýggj løgtingslóg ella kunngerð verður gjørd fyri hvørja serstaka árstíð ella ár. Tá verður tann eldra løgtingslógin ella kunngerðin ikki sett úr gildi, m.a. tí at TAKS metir, at tað er neyðugt, at løgtingslógin ella kunngerðin er í gildi, um teir skulu kunna panta fyri skuld o.tíl., ið skyldast burtur sambært ásetingum í løgtingslógini ella kunngerðini.

Eisini verða tíðaravmarkaðar ásetingar nýttar um t.d. ein skattahækking ella skattalækking bara skal vera galdandi eitt ávíst tíðarskeið. Tá er neyðugt samstundis at taka støðu til, hvat skal vera galdandi, tá ið tær tíðaravmarkaðu ásetingarnar fara úr gildi aftur. Verður støða ikki tikin til hetta í løgtingslógini ella kunngerðini, kemur einki í staðin fyri tær tíðaravmarkaðu ásetingarnar. Tær upprunaligu ásetingarnar, sum vóru undan teimum tíðaravmarkaðu ásetingunum, koma ikki sjálvvirkandi aftur í gildi.

Dømi um tíðaravmarkaðar ásetingar, har nýggjar koma í staðin:

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ...**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. ... frá ... um ..., sum broytt við .., verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 5, stk. 2 verður “25%” broytt til: “30%”.

**2.** Í § 7, stk. 3 verður “25%” broytt til: “30%”.

**3.** Í § 5, stk. 2 verður “30%” broytt til: “25%”.

**4.** Í § 7, stk. 3 verður “30%” broytt til: “25%”

**§ 2**

*Stk. 1.* § 1, nr. 1 og 2 koma í gildi 1. juli 2014.
*Stk. 2.* § 1, nr. 3 og 4 koma í gildi 1. januar 2015.

Tíðaravmarkað áseting er ikki tað sama sum sólseturáseting. Við tíðaravmarkaðum ásetingum er løgtingslógin ella kunngerðin framvegis í gildi, tá ið tíðarskeiðið er farið, meðan ein sólseturáseting viðførir, at løgtingslógin ella kunngerðin fer úr gildi, sí nr. 3.1.4. um sólseturáseting.

Dømi um løgtingslóg við tíðaravmarkaðum ásetingum er løgtingslóg nr. 117 frá 15. desember 2014 um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Tilfeingisskattur 2015) tingmál nr. 11/2014, og løgtingslóg nr. 89 frá 18. august 2014 um broyting í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap (Fiskidagar 2014/15). Tingmál nr. 1/2014.

### 3.1.3. Útseting av gildiskomu

Í ávísum førum kann vera neyðugt at útseta gildiskomuna av einari løgtingslóg heilt ella partvíst. Útseting av gildiskomu eigur bara at verða nýtt í undantaksføri. Er lógin t.d. tengd at aðrari lóggávu, sum man ikki veit við vissu, nær kemur í gildi, kann tað vera heimilað avvarandi landsstýrismanni at áseta gildiskomuna í kunngerð.

Dømi um útsetta gildiskomu av allari løgtingslógini er § 14 í løgtingslóg nr. 51 frá 17. mai 2011 um ítróttavedding:

> **§ 14.** Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, nær lógin kemur í gildi.
> *Stk. 2.* Samstundis sum lógin fær gildi, fer løgtingslóg nr. 34 frá 23. apríl 1999 um ítróttavedding v.m. úr gildi.

Verður útseting av gildiskomu ásett, eigur at verða grundgivið fyri tí.

Útseting av gildiskomu er ikki tað sama sum skiftisreglur, sí nr. 3.9. um skiftisreglur.

Dømi um ymiska útsetta gildiskomu er løgtingslóg nr. 71 frá 30. mai 2011 um at broyta løgtingslóg um sjómenn, løgtingslóg um trygd á sjónum og løgtingslóg um manning av skipum:

> **§ 4**
>
> Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð, nær henda løgtingslóg kemur í gildi, undir hesum at ásetingar í hesi løgtingslóg fáa ymiska gildiskomu.

### 3.1.4. Sólseturáseting

Ein sólseturáseting er ein áseting, sum ásetur, at ein løgtingslóg ella kunngerð fer úr gildi ein ávísan dag.

Hetta kann vera tí, at løgtingið vil, at ein løgtingslóg skal endurskoðast innan ávíst tíðarskeið, og at landsstýrismaðurin á økinum skal leggja uppskot til nýggja løgtingslóg fyri løgtingið, sum skal fáa gildi, tá ið gamla lógin fer úr gildi.

Í kunngerð, sum skipar viðurskifti fyri eitt ávíst tíðarskeið í senn, t.d. kunngerðir um ymiskan fiskiskap í einum ári, verður solseturáseting brúkt.

Sum høvuðsregla verður mælt frá at nýta sólseturásetingar í lóggávu. Mælt verður heldur til at skriva í almennu viðmerkingarnar, at lógin skal endurskoðast innan ávíst tíðarskeið ella at brúka eina áseting um endurskoðan, sí nr. 3.1.5. um áseting um endurskoðan.

Tó hava verklagslógir altíð sólseturáseting, av tí at hesar lógir bara skulu hava gildi, til verklagið er liðugt. Tá ið verklagið er endað, hevur lógin tænt sínum endamálið og hevur ongan týdning longur. Sí nr. 1.1.8 um verklagslógir.

Løgtingslógir og kunngerðir fara úr gildi tann dagin, ið sólseturásetingin ásetur. Um endurskoðaða lógarverkið tá ikki verður sett í gildi samstundis, er eingin lóg á økinum. Fer løgtingslógin úr gildi, fara somuleiðis allar kunngerðir úr gildi, ið hava heimild í løgtingslógini.

Er løgtingslóg farin úr gildi, er ikki gjørligt at endurreisa tær. Tá má nýggj løgtingslóg setast í gildi. Verður sólseturáseting ásett, verður mælt til at brúka annaðhvørt 1. januar ella 1. juli sum endadag, tí hetta hóskar best við løgtingsárið.

Dømi um sólseturáseting er løgtingslóg. nr. 43 frá 26. mai 2008 um at byggja skúladepil í Tórshavn:

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2017.

### 3.1.5. Áseting um endurskoðan

Eftir umstøðunum kann tað verða skilagott at áseta í lógini, at landsstýrismaðurin í einum ávísum løgtingsári skal seta fram uppskot um endurskoðan av lógini.

Áseting um endurskoðan kann verða brúkt, tá ið tað er ynskiligt, at lógin skal verða eftirmett, tá ið hon hevur virkað í eina tíð. Tíðarskeiðið eigur at verða sett til minst 2 ár og upp til 5 ár, fyri at tað skal vera eitt rímiligt grundarlag at meta um royndirnar higartil við lógini. Tá tíðarskeiðið er farið, leggur landsstýrismaðurin fram uppskot um broytingar ella tillagingar í lógini, um tørvur er á tí.

Tað kann t.d. vera talan um eina lóg, sum eftir sínum innihaldi ber brá av at vera ein royndarskipan, og sum, tá ið ein ávís tíð er liðin, eigur at verða endurskoðað.

Onkuntíð eru eisini politisk atlit, sum gera tað ynskiligt, at áseting um endurskoðan verður sett í lógina.

Dømi um løgtingslóg við áseting um endurskoðan er § 39 í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, tingmál nr. 177/2011, og § 84 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, tingmál 10/2004.

## 3.2. Úrgildissetingarreglur

### 3.2.1. Úrgildisseting av løgtingslógum

### 3.2.2. Løgtingslóg við ongum skiftisreglum

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um ...**

Løgtingslóg nr. 108 frá 22. desember 1999 um uppihald á stovni o.l., verður sett úr gildi tann 1. januar 2012.

### 3.2.3. Er tað ivasamt, nær uppskotið verður samtykt, verður gjørt soleiðis

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um ...**

Løgtingslóg nr. 108 frá 22. desember 1999 um uppihald á stovni o.l. verður sett úr gildi.
*(Tá ið ongin dagfesting er við, kemur uppskotið í gildi dagin eftir, at tað er kunngjørt í Kunngerðablaðnum).*

### 3.2.4. Løgtingslóg við skiftisreglum

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um at seta úr gildi løgtingslóg um stuðul til telefonútreiðslur hjá langfarasjómonnum ...**

**§ 1**

Løgtingslóg nr. 96 frá 6. juni 1997 um stuðul til telefonútreiðslur hjá langfarasjómonnum verður sett úr gildi 1. november 2005.

**§ 2**

Umsóknir um vunnan telefonstuðul fyri 1. november 2005 skulu vera Fiskimálaráðnum í hendi í seinasta lagi 31. mars 2006. Umsóknir, sum koma inn eftir 31. mars 2006, verða ikki viðgjørdar.

**§ 3**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## 3.3. Afturvirkandi virknaður

Tað er ein meginregla í einum rættarsamfelagi, at ein borgari bara er bundin av galdandi rætti. Fyri at lóggáva skal verða galdandi, skal hon hava verið viðgjørd á Løgtingi tríggjar ferðir, har ein meiriluti við 3. viðgerð samtykkir løgtingslógina. Seinast 30 dagar eftir hesa samtykt, skal løgmaður staðfesta løgtingslógina, og síðan skal hon kunngerast á lógásettan hátt. Ikki fyrr enn eftir kunngerð er hon galdandi rættur og bindandi fyri borgaran.

Hóast ein løgtingslóg ella kunngerð ikki kann handhevjast fyrr enn hon er kunngjørd, kunnu tær hava ásetingar, sum gera, at tær innihaldsliga hava virknað aftur í tíð. Hetta merkir, at hendingar, sum fóru fram, áðrenn hesar løgtingslógir ella kunngerðir vórðu kunngjørdar, verða fevndar av ásetingunum í slíkari løgtingslóg ella kunngerð. Løgtingslógin ella kunngerðin verður tá søgd at hava afturvirkandi virknað.

Tá ið afturvirkandi virknaður gongur ímóti grundleggjandi meginreglum í einum rættarsamfelagi, eiga slíkar ásetingar bara at verða nýttar í undantaksføri. Tað skal altíð verða grundgivið fyri, hví tað verður mett neyðugt, at ásetingar skulu hava afturvirkandi virknað. Eru ásetingarnar tyngjandi fyri borgaran, krevur hetta enn gjøllari grundgeving. Ásetingar um revsing kunnu ongantíð hava afturvirkandi virknað.

Mælt verður frá at nýta ásetingar við afturvirkandi virknaði, serliga tá ið ásetingarnar eru tyngjandi.

### 3.3.1. Afturvirkandi virknaður í løgtingslóg

Í løgtingslóg er møguligt at áseta, at lógin ella partar av henni skulu hava afturvirkandi virknað. Í Grundlógini eru ikki ásetingar, ið forða tí. Tó hevur Evropeiski mannarættindasáttmálin art. 7, stk. 1 áseting, ið sigur, at revsing ikki má verða áløgd við afturvirkandi virknaði. Henda áseting er eisini galdandi í Føroyum.

Dømi um afturvirkandi virknað í løgtingslóg:

<u>Um øll løgtingslógin skal hava virknað frá ávísum degi:</u>

**§ 29.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. juli 2012.

<u>Um ávísar ásetingar skulu hava virknað frá ávísum degi:</u>

**§ 30.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* §§ 4, 5 og 6 hava tó virknað frá 1. august 2013.

### 3.3.2. Serligt um skatt viðvíkjandi afturvirkandi virknaði

Stýrisskipan Føroya hevur eina seráseting, ið snýr seg um afturvirknadi virknað viðv. skatti.

Stýrisskipanarlógin ásetur: "§ 41, stk. 2. Beinleiðis ella óbeinleiðis skattur kann ikki verða álagdur fyri inntøkur, innflutning, útflutning, sølu, gjald ella tílíkt, sum er farið fram í tíðini, áðrenn løgtingslógaruppskot um hetta varð lagt fyri løgtingið."

Tá ið tað snýr seg um skatt, er tískil ikki gjørligt at áleggja virknaðin aftur um dagfestingina tá ið uppskotið bleiv lagt fyri Løgtingið.

Dømi um afturvirkandi virknað tá ið tað snýr seg um skatt:

**§ 31.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* §§ 7 og 8 hava tó virknað frá framløgudegnum á Løgtingi.

### 3.3.3. Afturvirkandi virknaður í kunngerð

Í kunngerð er eisini gjørligt at áseta afturvirkandi virknað, tá ið talan er um ásetingar, ið ikki eru tyngjandi. Tó er ikki gjørligt í kunngerð at áseta afturvirkandi virknað, tá ið talan er um ásetingar, ið eru tyngjandi. Ikki uttan so, at hesin møguleiki er greitt heimilaður í løgtingslóg.

## 3.4. Kærureglur

### 3.4.1. Kærureglur eftir fyrisitingarrættinum

Tá ið tað snýr seg um lóggávu, har almennir myndugleikar skulu taka avgerðir, t.d. játta veitingar til borgaran, eitt nú ymsar almannaveitingar, útflýggja loyvi ella onnur rættindi til borgara ella fyritøku, skal støða takast til, hvørjar kærureglur eru galdandi.

Eru ongar kærureglur ásettar í løgtingslógini, ásetur fyrisitingarrætturin, at kærast kann til tann myndugleikan, ið er yvirskipaður í mun til tann myndugleika, ið tók avgerðina, t.d. frá einum stovni undir einum stjórnarráði til viðkomandi landsstýrismann. Er onki ásett um kærufreist, er tá ongin freist at kæra avgerðina. Avgerðin hjá landsstýrismanninum er endalig innan fyrisitingina.

Støða eigur at verða tikin til, um kærumøguleikarnir skulu fylgja fyrisitingarrættinum ella um kærast skal til serstakan kærumyndugleika, t.d. eina kærunevnd. Tað er góður lóggávusiður at áseta reglur um kæru og kærufreist í lógini, eisini tá ið kærast kann til landsstýrismannin.

Dømi um kæruáseting sambært fyrisitingarrættinum er løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar:

**§ 22.** Avgerð, sum skúlastýri og leiðari skúlans hava tikið, kann verða kærd til landsstýrismannin í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað.

### 3.4.2. Kærunevndir o.tíl.

Tað krevst altíð beinleiðis heimild í lóg at skerja fyrisitingarliga kærumøguleikan. Hetta kann verða gjørt við at seta í løgtingslógina, at avgerðir skulu kærast til eina ávísa kærunevnd, og at avgerðirnar hjá kærunevndini eru endaligar innan fyrisitingina.

Dømi um at tað í lógini beinleiðis er ásett, at kærumyndugleikin er ein kærunevnd, er løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m.:

**§ 25.** Avgerðir eftir hesi lóg, sum eru tiknar av Almannaverkinum ella øðrum myndugleika sambært § 22, stk. 2, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.

Dømi um ymiskar kæruásetingar er í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan:

**§ 59.** Avgerð, sum skúlamyndugleikin á staðnum, herímillum eisini leiðari skúlans, hevur tikið, kann verða kærd til landsstýrismannin í seinasta lagi 4 vikur, eftir at avgerðin er fráboðað, smb. tó § 57, 9. stk.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann taka avgerð um, at kærur um sernámsfrøðiliga ráðgeving, stuðul og/ella serundirvísing, sbrt. § 4, stk. 3-5, verða lagdar til kærunevnd, ið tekur endaliga støðu til hesar kærur.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ger nærri reglur fyri vali av nevndarumboðum, samanseting av nevnd og kæruviðgerð hjá kærunevndini, sbrt. stk. 2

## 3.5. Gjøld

### 3.5.1. Skattir og avgjøld

Munur er á skattum og avgjøldum og øðrum gjøldum, sí § 41 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya. Skattir og avgjøld kunnu bara verða ásett beinleiðis í løgtingslóg. Tað ber ikki til at áseta skattir og avgjøld í kunngerð. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta gjøld, um tey hava beinleiðis heimild í løgtingslóg.

Skattir og avgjøld eru eyðkend við, at upphæddin, ið verður kravd, ikki neyðturviliga samsvarar við ta tænastu, ið borgarin fær afturfyri. Tað kann eisini vera, at borgarin onga beinleiðis tænastu fær aftur fyri skattin ella avgjaldið. Peningurin, ið kemur inn, fer ikki á eina serstaka konto ella til eitt oyramerkt endamál, men fer í landskassan.

### 3.5.2. Gjøld

Gjøld, so sum nýtslugjøld, brúkaragjøld, gjøld fyri ymisk loyvi o.s.fr., eiga at hava heimild í løgtingslóg. Gjaldið má ikki vera hægri enn útreiðslurnar, sum eru av virkseminum í sambandi við ta ítøkiliga tænastuna ella veitingina. Er gjaldið hægri enn hetta, er talan um ein skatt ella eitt avgjald.

Gjald verður oftani nýtt á økjum, har borgarin fær onkra beinleiðis tænastu frá einum almennum myndugleika, t.d. tá ið søkt verður um pass ella koyrikort, ella í sambandi við útskriving av loyvum av ymsum slag, t.d. vinnuloyvi og søluloyvi.

*Gjøld*
**§ 7.** Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta gjald fyri at útskriva loyvi ...

## 3.6. Revsiásetingar

### 3.6.1. Revsiásetingar í løgtingslóg

Revsiásetingar eiga bara at vera settar inn í lógina, um tað verður hildið at vera neyðugt at hava revsiásetingar, fyri at náa endamálinum við lógini.

Revsiásetingar eiga neyvt at skila til tær ásetingar í lógini, hvørs brot kunnu hava við sær revsing. Tað er ikki neyðugt at endurtaka slíkt, sum frammanundan er revsivert sambært revsilógini, so sum at geva skeivar upplýsingar §§ 161-163 ella reglur um tagnarskyldu sambært § 152 og §§ 152 a-f. Heldur ikki er neyðugt at endurtaka aðrar reglur sum t.d. reglurnar um konfiskatión í revsilógini § 75, §§ 76-76 a og §§ 77-77 a.

Tað skal eisini verða havt í huga, at sambært revsilógini § 19 fevnir revsing sambært serlóggávu bæði um tilætlað og óviljað brot. Tí eigur í hvørjum einkultum føri at verða umhugsað, um revsing eigur at verða avmarkað til tilætlað brot í serlóggávu.

Tað skal verða ásett í løgtingslógini, um revsing eisini skal kunna verða løgd á *løgfrøðiligar persónar*. Hetta verður gjørt við at vísa til reglurnar í kapittul 5 í revsilógini og verður orðað soleiðis:

**§ 33.** Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært reglunum í kapittul 5 í revsilógini.

Vanliga eigur revsiramman í serlóggávu ikki at vera sett hægri enn fongsul upp til 2 ár. Lógarbrot sum eru so álvarslig, at tey kunna hava við sær longri fongsulsrevsing, eiga at vera sett inn í revsilógina.

Verður revsiheimild ásett í løgtingslógini, ið heimilar revsiásetingar í kunngerð, skal sjálv revsiramman standa í løgtingslógini. Somuleiðis skal standa í løgtingslógini, at brot á ásetingar givnar við heimild í hesi løgtingslóg kunnu revsast.

Dømi: Løgtingslóg nr. 21 frá 16. mars 2012 um havnaloðsing:

**§ 19.** Við bót verður tann revsaður, sum fremur brot á § 4, stk. 1, § 7, stk. 1, § 8, § 9, stk. 4, § 12, stk. 3 ella § 15.
*Stk. 2.* Skipari og reiðari á skipinum verða revsaðir, um góðkendur loðsur ikki verður brúktur, sum ásett í § 4, stk. 1.
*Stk. 3.* Revsingin kann herðast til fongsul í upp til 1 ár, um brotið er framt við vilja ella av grovum ósketni, og um sama brot verður endurtikið.
*Stk. 4.* Í reglum, sum ásettar verða við heimild í § 5, § 9, stk. 3, § 10, stk. 3, § 11, § 12, stk. 2 og § 14, stk. 1 , kann ásetast revsing við bót. Somuleiðis kann ásetast, at revsingin kann herðast til fongsul í upp til 1 ár undir somu umstøðum, sum nevndar eru í stk. 3.
*Stk. 5.* Løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært kapittul 5 í revsilógini.
*Stk. 6.* Kommuna, sum er vitandi um ella átti at vita, at loðsskyldugt skip kemur í havn uttan loðs, verður revsað við bót.
*Stk. 7.* Málini verða viðgjørd sum løgreglumál. Rættarmeðalin í rættargangslógarinnar kapitlum um at leggja hald á og rannsókn kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

Dømi: Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum:

**§ 44.** Er ikki hægri revsing ásett í aðrari lóggávu, verður tann revsaður við bót, sum

1) brýtur § 7, stk. 1, § 8, stk. 1, § 13, stk. 1, § 14, stk. 1 og 2, § 17, § 21, stk. 1 og § 25, stk. 1,
2) setur treytir sambært § 18, stk. 2 og § 25, stk. 2 til viks,
3) ikki letur inn fráboðan sambært § 26, stk. 1-2, ella upplýsingar sambært § 26, stk. 3,
4) ikki fylgir banni ella boðum sambært § 31, stk. 1-2, ella banni sambært § 32, stk. 1 og 2,
5) forðar kanningum sambært § 30, stk. 1 og 2, ella eftirliti sambært § 34, stk. 1 og 2, ella
6) forðar fyri, at skip verður hildið aftur sambært § 33, stk. 2.

*Stk. 2.* Ásetan av bót fyri brot á § 7, stk. 1 og 2 skal hava støði í tí nøgd av olju, ið er burturbeind.
*Stk. 3.* Revsingin kann hækka til fongsul í upp til 2 ár, um brotið er framt við vilja ella við grovum ósketni, og um tað við brotinum er

1) voldur skaði á umhvørvið, ella elvt er til vanda fyri slíkum skaða, ella
2) peningaligur fyrimunur er fingin, ella tílíkur fyrimunur hevur verið tilætlaður fyri viðkomandi sjálvan ella onnur, eitt nú við sparingum.

*Stk. 4.* Reglurnar í stk. 3 eru ikki galdandi fyri brot, framd av útlendskum skipum. Fyri brot, framd av útlendskum skipum, kann revsingin hækka til fongsul í 2 ár, um brotið er framt á sjóumveldinum, og dálkingin er álvarsom og framd við vilja.

**§ 45.** Í reglum, sum eru ásettar við heimild í § 7, stk. 2, § 8, stk. 2, § 9, § 10, § 11, § 12, stk. 2, § 13, stk. 3-6, § 14, stk. 4, § 15, § 16, § 18, stk. 2, §§ 19-20, §§ 27-29, §§ 35- 37 og § 41, stk. 1, kunnu verða ásettar reglur um revsing við bót. Tað kann somuleiðis verða ásett, at revsingin kann hækka til fongsul í upp til 2 ár undir umstøðum, sum eru samsvarandi teimum, ið eru nevndar í § 44, stk. 3. Fyri brot, framd av útlendskum skipum, kann tó einans ásetast, at revsingin kann hækka til fongsul í 2 ár undir samsvarandi umstøðum, sum nevndar í § 44, stk. 4.
*Stk. 2.* Ásetan av bót fyri brot á reglur, ásettar sambært § 7, stk. 2 og § 19, skal hava støði í tí nøgd av olju, ið er burturbeind.

### 3.6.2. Revsiásetingar í kunngerð

Revsing kann einans verða ásett í kunngerð, um tað er heimilað í løgtingslóg. Revsingin kann ikki vera hægri enn revsiramman í løgtingslógini heimilar.

Meginreglan er, at revsingin sambært kunngerð er bót. Fongsulsrevsing eigur bara at verða sett inn í revsirammuna, um tað er sannlíkt, at dómstólarnir vilja døma fongsulsrevsing fyri slík brot. Verður fongsulsrevsing sett inn í revsirammuna, eigur hendan revsing at vera avmarkað til tilætlað brot á kunngerðina.

Dømi: Kunngerð nr. 118 frá 16. desember 2010 um ozonoyðandi evni:

Við heimild í §§ 7, 8, 34 a, 34 d og 72 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008 og §§ 15, 29 og § 45 í løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum, verður ásett:

**§§ 1-17** ...

**§ 18.** Tann, ið brýtur ásetingarnar í § 4, § 5, stk. 2, § 6, § 7, stk. 1 og §§ 9-13 í hesi kunngerð, ella ikki aktar boð givin við heimild í kunngerðini, verður revsaður við bót.
*Stk. 2.* Revsingin kann hækka til fongsul í upp til 1 ár undir umstøðum, samsvarandi teimum, nevndar í § 44, stk. 3 í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum, ella í § 72, stk. 3 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.
*Stk. 3.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapittul 5 í revsilógini.
*Stk. 4.* Málini verða viðgjørd sum løgreglumál. Rættartiltøkini í kapittul 72 í rættargangslógini um at leggja hald á og í kapittul 73 um rannsókn, eru tó galdandi í sama mun sum í málum, sum verða viðgjørd av statsadvokatinum.

Dømi: Kunngerð nr. 152 frá 18. desember 2012 um loðsprógv og loðsfrítøkuskjal v.m.:

Við heimild í § 5, § 9, stk. 3, § 12, stk. 2, § 14, stk. 1 og 2, § 16 og § 19, stk. 4 í løgtingslóg nr. 21 frá 16. mars 2012 um havnaloðsing verður ásett:

**§§ 1-17** ...

**§ 18.** Við bót verður tann revsaður, ið fremur brot á § 3. Á sama hátt verður tann revsaður, sum loðsar, hóast viðkomandi ikki hevur rætt til at loðsa, og tann sum ikki letur inn loðsprógv ella loðsfrítøkuskjal samsvarandi § 2, stk. 3 og § 11, stk. 1.
*Stk. 2.* Loðsstøð, sum grovt ella ferð eftir ferð fremur brot á § 12, stk. 1-3 og § 15, verður revsað við bót.
*Stk. 3.* Løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært 5. kapitli í revsilógini.

### 3.6.3. Hefti sum revsing er strikað

Hefti sum revsing varð strikað við einari broyting í revsilógini, sum fekk gildi 1. januar 2010. Frá hesum degi er tað ikki longur møguligt at døma heftirevsing, sjálvt um ein revsiáseting í aðrari lóggávu framvegis heimilar tí. Í staðin fyri hefti kann tá verða dømt fongsul upp til 4 mánaðar.

Í serlóggávu sum framvegis heimilar hefti sum revsing, eigur hetta at verða broytt til fongsul upp til 4 mánaðar.

Hetta eigur at verða rættað, tá ið løgtingslóg ella kunngerð verður broytt.

## 3.7. Fyrisitingarlig sekt

Vanliga eru tað fútin og rætturin, sum taka sær av málum, tá ið talan er um rættarverju og revsing. Vísandi til atlitið til rættartrygd, eigur tað at verða víst varsemi við at geva fyrisitinginin heimild til at geva fyrisitingarlig sektaruppskot.

Tað krevst beinleiðis heimild í lógini, um fyrisitingin skal kunna geva fyrisitingarliga sekt fyri ávís lógarbrot.

Fyrisitingarlig sekt eigur bara at vera loyvd í teimum førum, tá ið talan er um lógarbrot, sum eru einføld og uttan próvligar ivaspurningar.

Í heimildini at skriva sektaruppskot eigur at vera ásett, at reglurnar í rættargangslógini um krøv til innihaldið í einum ákæruriti, og reglurnar um, at ein ákærdur ikki hevur skyldu til at siga nakað, eisini verða brúktar til sektaruppskot.

Dømi: Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum:

**§ 46.** Landsstýrismaðurin ella tann, ið landsstýrismaðurin heimilar, kann í málum um brot á § 7 um burturbeining av olju, har ikki verður roknað við hægri revsing enn bót, í einum sektaruppskoti boða frá, at málið kann verða avgjørt uttan rættarmál, um tann, ið hevur framt brotið, játtar seg sekan í brotinum og váttar at vera til reiðar at gjalda bótina sambært sektaruppskotinum innan nærri ásetta freist. Eftir áheitan kann landsstýrismaðurin ella tann, ið landsstýrismaðurin hevur heimilað, leingja freistina. Á sama hátt kunnu krøv um inndrátt, sum t.d. inndrátt av virðum, verða avgjørd uttan rættarmál.

*Stk. 2.* Stk. 1 verður samsvarandi nýtt í málum um brot á fráboðanarskylduna sambært § 26 og í málum um brot á reglur, ásettar sambært § 19 viðvíkjandi burturbeining av olju frá havstøðum.

*Stk. 3.* Reglurnar í rættargangslógini um krøv til innihaldið í ákæruritum og reglurnar um, at ein ákærdur ikki hevur skyldu at geva frágreiðing, verða samsvarandi nýttar viðvíkjandi sektaruppskotum.

*Stk. 4.* Góðtekur tann, ið hevur framt brotið, bótina, fellur rættarsóknin burtur.

## 3.8. Pantiheimild

Heldur tað almenna seg hava eitt fíggjarligt krav móti einum borgara, sum ikki vil gjalda, so er meginreglan, at kravið eigur at verða lagt fyri dómstólarnar, og tá ið dómur fyriliggur, kann verða biðið um úttøku í fútarættinum.

Í lóg kann vera givið einum myndugleika heimild at gera úttøku uttan at ein dómur fyriliggur frammanundan.

Við atliti til rættartrygdina eigur ein myndugleiki bara at fáa pantingsrætt viðvíkjandi krøvum, sum tað frammanundan verður væntað ikki hava við sær próvligar ella rættarliga ósemjur.

Dømi: Løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi:

> **§ 22.** Skattur og sekt, sum stava frá inntøku, ið er skattskyldug eftir hesi lóg, og eru fallin til gjaldingar, kunnu saman við rentum og innkrevjingarkostnaði verða innheintað við panting.
> *Stk. 2.* Toll- og Skattstova Føroya fremur panting sambært stk. 1 eftir reglunum í skattalógini fyri innkrevjing av skattum.

Dømi: Revsilógin:

> **§ 52. ...**
> *Stk. 4.* Politiet kan inddrive bøder, sagsomkostninger og konfiskerede beløb i straffesager, der forfølges af det offentlige, ved udpantning og ved indeholdelse i den pågældendes indtægter efter reglerne om inddrivelse af personlige skatter i lov nr. 85 af 30. marts 1935 om inddrivelse af skatter og afgifter til det offentlige m.m.
> *Stk. 5.* Pålæg om indeholdelse efter stk. 4 gives af politiet, som også modtager de indeholdte beløb. Indeholdelsen sker efter indeholdelse for skatte- og afgiftskrav og krav på underholdsbidrag. Politiet kan hos andre offentlige myndigheder indhente de oplysninger, der er nødvendige for at varetage indeholdelsen, herunder oplysninger om indkomst- og formueforhold. Endvidere kan politiet fra alle af offentlige myndigheder førte registre og de af domstolene førte registre over løsøre og fast ejendom kræve de oplysninger om skyldnerens forhold, som findes af betydning for tvangsfuldbyrdelsen. Oplysningerne meddeles skriftligt eller ved direkte dataoverførsel.
> *Stk. 6.* ...

## 3.9. Skiftisreglur

Tá ið løgtingslóg og kunngerð verður gjørd, eigur tað altíð at verða umhugsað, um gildissetingin av nýggju rættarreglunum kunnu hava skiftistrupulleikar við sær, soleiðis at tað er neyðugt at hava serligar skiftisreglur.

Ofta eru skiftisreglur bara galdandi fyri ein ávísan bólk av persónum ella t.d. ávíst slag av fyritøku ella virksemi. Tá ið talan er um skiftisreglur, er lógin sett í gildi, tó soleiðis at tað eru ávísir bólkar av persónum, fyritøkum o.s.fr., sum fáa eitt hóskandi skotbrá at laga seg til nýggju reglurnar.

Dømi um skiftisreglu í eini upprunalóg:

> **§ 35.** Tey, sum reka ognarmiðlanar- og meklaravirksemi, tá lógin kemur í gildi, hava framvegis rætt til at reka hetta virksemi, hóast tey ikki lúka treytirnar í ...
> *Stk. 2.* Tey, sum eru fevnd av ásetingini í stk. 1, skulu tó innan 1. januar 2016 lúka øll krøv lógarinnar.

Skiftisreglur kunnu setast í gildiskomuásetingini sum stk. 2 ella í sjálvstøðugari grein aftan á gildiskomuásetingina. Eru tað nógvar skiftisreglur er ofta betri at seta skiftisreglurnar í eina sjálvstøðuga grein  Sí dømi í skjali 1 um upprunalóg, har skiftisreglan er í § 16.

Um skiftisregluásetingin í eini broytingarlóg ella broytingarkunngerð hevur fleiri stykki, verður "stk. 1" eisini tilskilað í greinini. Sí nr. 3.1.1. um gildiskomu.

Dømi við skiftisreglu í eini broytingarlóg sæst í nr. 2.2.4. um inngang og uppseting í greinir og stykkir í broytingarlógum, og dømi við skiftireglu í broytingarkunngerð sæst í nr. 2.3.4. um inngang og uppseting í greinir og stykkir í broytingarkunngerðum.

# Partur IV

*Uppseting av ríkislógartilmælum*

## 4.1. Hvat er eitt ríkislógartilmæli?

Á teimum málsøkjum, sum ikki eru yvirtikin, er donsk ríkislóggáva galdandi. Ríkislógir eru fólkatingslógir, sum verða samtyktar av Fólkatinginum í Danmark. Málsøkini, sum eru undir donskum málsræði, verða kallað felagsmál.

Ríkislógartilmæli er eitt tilmæli frá løgtinginum til danskar ríkismyndugleikar um at seta í gildi fyri Føroyar eina ávísa ríkislóg ella kongliga fyriskipan, sum setur í gildi ríkislóg fyri Føroyar.

Í felagsmálum er hugsanin, at lóggávan á hesum málsøkjum eigur at vera tann sama í Danmark og Føroyum. Tað er bara í undantaksføri, at serlig lóg verður gjørd, sum bara skal vera galdandi fyri Føroyar.

### 4.1.1. Serstøk ríkislóg fyri Føroyar

Ríkislógartilmæli kann vera ein áheitan um at seta í gildi fyri Føroyar eina serstaka ríkislóg fyri Føroyar. Slík fólkatingslóg skal eisini viðgerast og samtykkjast í Fólkatinginum, áðrenn hon kann fáa gildi í Føroyum.

Dømi um serstaka ríkislóg fyri Føroyar er rættargangslógin fyri Føroyar. Rættargangslógin og broytingar í henni skulu altíð gerast við serstakari fólkatingslóg fyri Føroyar. Hetta er tí, at tað stendur í grundlógini § 62, at reglur um rættargang altíð skulu ásetast við lóg. Tá kann konglig fyriskipan ikki brúkast.

Eitt annað dømi um serstaka ríkislóg fyri Føroyar er "Lov nr. 462 af 17. juni 2008 for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse". Serstøk ríkislóg verður brúkt, tá ið t.d. danska lógin á málsøkinum ikki er hóskandi til Føroyar, ella um føroyingar ynskja serliga lóggávu í Føroyum, sum ikki eisini skal galda í Danmark.

Hesar lógir hava altíð orðingina "Lov for Færøerne ..." í heitinum.

### 4.1.2. Konglig fyriskipan (anordning)

Tað mest vanliga er, at ein danskur ráðharri hevur fingið heimild í einari samtyktari danskari fólkatingslóg við kongligari fyriskipan at seta ríkislógina heilt ella partvíst í gildi fyri Føroyar. Hendan heimildin er ásett seinast í lógini saman við territorialásetingini.

Dømi um fyriskipanarheimild:

**§ 11**

*Stk. 1.* Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, jf. dog stk. 2.
*Stk. 2.* Loven, bortset fra § 3, kan ved kongelig anordning helt eller delvis sættes i kraft for Færøerne og Grønland med de ændringer, som de færøske og grønlandske forhold tilsiger.

Tá ið ein ríkislóg verður sett í gildi við kongligari fyriskipan, kunnu ikki verða gjørdar innihaldsligar broytingar í lógini, uttan tað, sum er neyðugt vegna serlig føroysk viðurskifti. Sum oftast snýr tað seg um at laga lógina til føroysk viðuskifti, soleiðis at víst verður til viðkomandi myndugleika og lóggávu í Føroyum.

Tað ber til at seta eina ríkislóg partvíst í gildi, t.d. ikki at taka ein kapittul við, sum ikki er viðkomandi fyri Føroyar. Sum høvuðsregla kann verða sagt, at tað ber til at velja og vraka millum greinir í donsku lógini, men ikki ber til at seta nýggjar greinir inn.

Løgting og landsstýrið kunnu hava ynski um broytingar í kongligari fyriskipan, men tað er ráðharrin í viðkomandi stjórnarráði í Danmark, sum ger av, um ein broyting liggur innan fyri fyriskipanarheimildina ella ikki.

Tá ið broyting skal gerast í einari fyriskipan, kann hetta verða gjørt við einari broytingarfyriskipan.

### 4.1.3. Ríkislóg sum hevur beinleiðis gildi í Føroyum

Í nøkrum førum skal ein ríkislóg galda beinleiðis í Føroyum. Tá hevur lógin onga territorialáseting, men bara ígildiskomuáseting. Tá ið lógin er samtykt og kunngjørd, kemur hon vanliga samstundis í gildi í Føroyum, Grønlandi og Danmark.

Hesar ríkislógir verða eisini lagdar fyri Løgtingið sum ríkislógartilmæli, har Løgtingið mælir ríkismyndugleikunum til at seta ríkislógina í gildi fyri Føroyar. Av tí at ríkislógin tá samstundis er til viðgerðar í Fólkatinginum, skal viðgerðin av ríkislógartilmælinum í Løgtinginum verða liðug og uppskotið samtykt, áðrenn ríkislógin verður endaliga samtykt av Fólkatinginum.

Av tí at tað í hesum førum er talan um eina enn ikki endaliga samtykta ríkislóg, er tað møguligt hjá Løgtinginum at seta fram ynski um innihaldsligar broytingar í lógini. Hetta er øðrvísi, enn tá ið talan er um ríkislógir, sum verða settar í gildi við kongligari fyriskipan.

Dømi um ríkislóg sum geldur beinleiðis fyri Føroyar: Lov nr. 1003 frá 10. oktober 2008 om finansiel stabilitet, sum seinast broytt við lov nr. 273 frá 27. mars 2012.

## 4.2. Formlig krøv til innihald í ríkislógartilmælum

### 4.2.1. Ríkislógartilmæli

Formligu krøvini til innihaldið í ríkislógartilmælum eru sambært § 45 í Tingskipan Føroya Løgtings, tey somu sum til løgtingslógaruppskot sambært § 37. Í tingskipanini § 37 eru ásett minstukrøvini til løgtingslógaruppskot, sum skal leggjast fyri Løgtingið. Hetta rundskrivið ásetir fleiri krøv enn sum ásett í tingskipanini § 37 til tey lógaruppskot, sum landsstýrið leggur fyri Løgtingið. Sí nr. 1.2. um viðmerkingar til løgtingslógaruppkot.

Sambært § 15, stk. 1 í stýrisskipanarlógini kann løgmaður, landsstýrismaður og løgtingslimur seta fram ríkislógartilmæli í løgtinginum.

Viðgerðin á Løgtingi av einum ríkislógartilmæli er tann sama sum av einum løgtingslógaruppskoti. Ríkislógartilmæli kann ikki verða endaliga samtykt uttan at hava fingið tríggjar viðgerðir á tingi, og tað verður vanliga eisini viðgjørt av einari løgtingsnevnd millum 1. og 2. viðgerð.

§ 37 í tingskipanini er soljóðandi:

**§ 37.** Løgtingslógaruppskot skulu hava lógarsnið og skulu hava eitt heiti, sum sigur stutt, hvat í uppskotinum stendur.
*Stk. 2.* Í stórum løgtingslógaruppskotum skal uppskotið verða býtt í hóskandi kapittul við yvirskrift, sum sigur frá tí, ið kapitlinum stendur. Í løgtingslógaruppskotum skulu ikki vera ov langir setningar, og skulu løgtingslógaruppskotini vera býtt í hóskandi greinir og stk.
*Stk. 3.* Í viðmerkingunum til lógaruppskot skulu verða hesar viðmerkingar:

**1. Almennar viðmerkingar**, t.v.s.
a) Frágreiðing um galdandi lóggávu og upplýsingar um, hvussu hevur verið, og kann verða funnist at henni,
b) ein stuttur samandráttur av nýskapanini við uppskotinum,
c) hvør fíggjarligur kostnaður stendst av uppskotinum,
d) hvørjir almennir stovnar ella aðrir hava havt uppskotið til ummælis, og hvørjar viðmerkingar teirra hava verið, og

**2. Serligar viðmerkingar**, har greitt verður frá innihaldinum av hvørjari einstakari grein í uppskotinum. Eisini skal her verða greitt frá ætlanini við greinini, og hvussu hon skal skiljast.

Ríkislógartilmæli víkja grundleggjandi frá løgtingslógaruppskotum við tað, at talan vanliga er um lógartekst, sum longu er galdandi í Danmark, og at ríkismyndugleikarnir í flestu førum hava gjørt uppskotini.

### 4.2.2. Kunngerð við heimild í ríkislóg (bekendtgørelse)

Sambært stýrisskipanarlógini § 49 er tað avvarðandi landsstýrismaður, sum ummælir uppskot til kunngerðir, sum ráðharri sendir landsstýrinum við atliti at gildisseting í Føroyum. Talan er ofta um kunngerðir, sum longu eru galdandi í Danmark, og at ríkismyndugleikarnir í flestu førum hava gjørt uppskotini. Í nøkrum førum verður gjørd ein serstøk kunngerð fyri Føroyar, tá ið t.d. danska kunngerðin á málsøkinum ikki er hóskandi fyri Føroyar, ella tá ið talan er um kunngerð, sum hevur heilmild í serstakari ríkislóg fyri Føroyar.

Í donskum kunngerðum eigur serliga at verða hugt eftir, um tað í innganginum verður víst til lóg ella kunngerð, sum er sett í gildi í Føroyum, og hvørjar tillagingar eru gjørdar til føroysk viðurskifti.

## 4.3. Uppseting av ríkislógartilmæli

### 4.3.1. Word, skrift og skriftstødd

Ríkislógartilmælisuppskotið verður skrivað í Word. Skriftin skal vera Times New Roman, skriftstøddin skal vera 12 og reglugloppið skal vera 1,0. Teksturin skal vera vinstrastillaður og orðbýti skal ikki verða nýtt. Typografi funktiónin í Word skal ikki nýtast heldur. Er neyðugt at brúka tabellir og myndir, eiga hesi ikki at verða sett inn í sjálvan ríkislógartilmælistekstin, men eiga at verða sett í eitt skjal. Slóðir til heimasíður og teldupost adressu skulu hvørki vera virknar ella undirstrikaðar.

Ovast á uppskotinum verður tilskilað:

**Løgtingið**

Dagfesting:
Mál nr.:
Málsviðgjørt:

**Løgtingsmál nr. xx/2014: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed**

| | |
|---|---|
| *Dagfesting:* | Dagurin, ríkislógartilmælið verður sent løgtinginum. |
| *Mál nr.:* | Journal nummarið, ið stjórnarráðið hevur givið ríkislógartilmælinum. |
| *Málsviðgjørt*: | Forbókstavirnir á tí embætisfólkinum, ið hevur viðgjørt málið. |
| *Løgtingsmálsnr:* | Árstalið á løgtingsmáli fylgir tingárinum (ikki kalendaraárinum). Tingárið byrjar á ólavsøku og endar á ólavsøku fylgjandi árið. T.d. tingár 2014 er frá 29. juli 2014 til 28. juli 2015. |

### 4.3.2. Heitið á ríkislógartilmæli við ígildisseting av ríkislóg við kongligari fyriskipan (anordning)

Heitið á ríkislógaruppskoti verður miðsett og skrivað við feitum stavum:

Dømi við ígildisseting av einari høvuðslóg: Lov om psykologer m.v. verður sett í gildi í Føroyum:

**Uppskot til**

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar**
**Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om psykologer m.v.**

Dømi við ígildisseting av einari ella fleiri broytingarlógum: Lov om ændring af lov om finansiel virksomhed verður sett í gildi í Føroyum:

**Uppskot til**

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar**
**Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om finansiel virksomhed**

### 4.3.3. Heiti á ríkislógartilmæli við ígildisseting av serstakari ríkislóg fyri Føroyar

Dømi:

**Uppskot til**

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar**
**Lov for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse**

### 4.3.4. Stytt heiti

Ríkislóg, sum verður sett í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan (anordning) ella sum serstøk ríkislóg fyri Føroyar, kann hava eitt stytt heiti.

Hevur lógin eitt stytt heiti, verður tað sett í klombur og skrivað við feitum stavum á linjuna undir vanliga heitinum:

Dømi:

**Uppskot til**

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar**
**Anordning om ikrafttræden af lov om Det Centrale Dna-profilregister**
**(Dna-profil-loven)**

### 4.3.5. Frágreiðandi heiti

Mælt verður til at geva einum broytingaruppskoti eitt frágreiðandi heiti, sum stutt og greitt lýsir, hvat broytingin snýr seg um, t.d. (Gennemførelse af virksomhedspant) :

**Uppskot til**

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar**
**Anordning om delvis ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af konkursloven**
(Gennemførelse af virksomhedspant)

### 4.3.6. Stytt og frágreiðandi heiti samansett

Verður broytt í einari lóg, ið er kunngjørd við einum styttum heiti, og uppskotið fær eitt frágreiðandi heiti, verður tað sett upp soleiðis:

**Uppskot til**

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar**
**Lov om ændring af lov for Færøerne af rettens pleje (Retsplejeloven)**
(Indgreb i meddelelseshemmeligheden, observation, dataaflæsning, forstyrrelse eller afbrydelse af radio- eller telekommunikation og videoafhøring af børn m.v.)

## 4.4. Orðing av tilmælinum

### 4.4.1. Lógaruppskotið verður lagt við sum skjal

Sjálvt tilmælið til ríkismyndugleikarnar verður sett niðanfyri heitið og verður vanliga orðað soleiðis:

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ..., hjálagt sum skjal 1.

Tá skal sjálvt lógaruppskotið leggjast við ríkislógartilmælinum sum skjal 1. Hetta er ein lagaligur háttur at brúka, serliga tá ið talan er um stór lógaruppskot.

Dømi: Tingmál 144/2013:

**Uppskot til**

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar**
**Anordning om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om euforiserende stoffer**

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om euforiserende stoffer, hjálagt sum skjal 1.

Er talan um fleiri lógaruppskot í sama ríkislógartilmæli, sum ikki koma í gildi í senn, verður hvørt lógaruppskot lagt við ríkislógartilmælinum sum serstakt skjal.

Dømi: tingmál nr. 54/2010:

**Uppskot til**

**Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar**
**lóg um dna-profilregister**

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar hjáløgdu uppskot:

1. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om Det Centrale Dna-profilregister, hjálagt sum skjal 1
2. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om Det Centrale Dna-profilregister, hjálagt sum skjal 2
3. Anordning om ikrafttræden for Færøerne af visse love om ændring af lov om Det Centrale Dna-profilregister, hjálagt sum skjal 3.

### 4.4.2. Lógaruppskotið verður skrivað inn í ríkislógartilmælið

Tað ber eisini til at seta lógaruppskotið, tvs. allan lógartekstin, beinleiðis inn í ríkislógartilmælið, heldur enn at leggja tað við sum skjal.

Dømi: Tingmál 124/2013:

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar soljóðandi lóg:

**Forslag**
**til**
**lov om ændring af retsplejeloven for Færøerne og lov om ændring af tinglysningsloven, konkursloven og andre love (Virksomhedspant)**
(Indførelse af virksomhedspant på Færøerne)

**§ 1**

I retsplejeloven for Færøerne, jf. lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004, som ændret ved lov nr. 529 af 6. juni 2007, § 1 i lov nr. 505 af 12. juni 2009 og lov nr. 414 af 9. maj 2011, foretages følgende ændring:

**1.** I *§ 538 a* indsættes som *stk. 4*:
»*Stk. 4.* Reglerne i stk. 1, 1. pkt., stk. 2 og 3 finder tilsvarende anvendelse for adgangen til fyldestgørelse af krav, der er sikret ved virksomhedspant i fordringer, jf. § 47 d, stk. 3, nr. 1 i lagtingslov om tinglysning, og fordringspant, jf. § 47 e i lagtingslov om tinglysning.«

**§ 2**

I lov nr. 560 af 24. juni 2005 om ændring af tinglysningsloven, konkursloven og andre love (Virksomhedspant) foretages følgende ændring:

**1.** I § 7, stk. 2 ændres »Lovens § 2, nr. 2,« til: »Lovens § 2«.

**§ 3**

Loven træder i kraft den 1. januar 2015.

## 4.5. Lógaruppskotið í einum ríkislógartilmæli

Sjálvt lógaruppskotið í einum ríkislógartilmæli verður antin hjálagt sum skjal 1 ella beinleiðis innskrivað í ríkislógartilmælið. Sí nr. 4.1 um hvat er eitt ríkislógartilmæli og nr. 4.2 um formlig krøv til innihald í ríkislógartilmælum.

Vanliga eru tað danskir myndugleikar, sum hava gjørt uppskotið. Tað er týdningarmikið, at føroysku stjórnarráðini taka lut í arbeiðnum við lógaruppskotinum, tí danir kenna ikki til møgulig serlig føroysk viðurskifti, sum kunnu vera á økinum.

Í "Justitsministeriets vejledning nr. 59 af 2. juli 2012 om ministeriers behandling af sager vedrørende Færøerne" er í parti nr. 3 skrivað eitt sindur um, hvussu danskir myndugleikar eiga at viðgera lógaruppskot o.tíl. í mun til Føroyar.

### 4.5.1. Heimildarásetingin í kongligari fyriskipan

Danski ráðharrin kann bara brúka heimildina at seta eina lóg í gildi í Føroyum eina ferð. Í myndatalu verður sagt, at ráðharrin hevur: "Ét skud i bøssen".

Tað má tí verða umhugsað gjølla, um onkrar ásetingar skulu ikki hava gildi, tí tað ber ikki til seinni at angra og biðja um at fáa meira sett í gildi.

Í savningarlógum, har fleiri lógir verða broyttar í einari lóg, kann ráðharrin brúka heimildina eina ferð til hvørja lóg.

Dømi: Lov nr. 155 frá 28. februar 2012 om ændring af lov om finansiel virksomhed, lov om værdipapirhandel m.v., lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme og forskellige andre love samt ophævelse af lov om pengesedler i Grønland.

**§ 12**

*Stk. 1.* §§ 1-4, 6, 9 og 10 gælder ikke for Færøerne og Grønland, jf. dog stk. 2-5.
*Stk. 2.* § 5 gælder ikke for Færøerne.
*Stk. 3.* §§ 1-3, 6, 9 og 10 kan ved kongelig anordning sættes helt eller delvis i kraft for Færøerne og Grønland med de ændringer, som de færøske og grønlandske forhold tilsiger.
*Stk. 4.* § 4 kan ved kongelig anordning sættes helt eller delvis i kraft for Grønland med de ændringer, som de grønlandske forhold tilsiger.
*Stk. 5.* § 8 kan ved kongelig anordning sættes helt eller delvis i kraft for Færøerne med de ændringer, som de færøske forhold tilsiger.

### 4.5.2. Inngangur

Inngangurin í eini fyriskipan skal vísa á lógarásetingina, sum gevur ráðharranum heimild at seta lógina og møguligar broytingar í gildi fyri Føroyar. Við ígildisseting av broyting í ríkislóg fyri Føroyar skal í innganginum einans vísast til lógir, sum eru settar í gildi fyri Føroyar.

#### 4.5.2.1. Høvuðslóg verður sett í gildi

Í innganginum til eina kongliga fyriskipan verður víst til ríkislógina, sum skal setast í gildi, og heimildarásetingin í ríkislógini verður víst í einari notu. (her nota 2)

Dømi: Anordning nr. 721 frá 13. august 2001:

> I medfør af § 22[2)] i lov nr. 359 af 2. juni 1999 om undersøgelse af politiets efterretningsvirksomhed på det politiske område og af de aktiviteter, der var baggrunden for denne virksomhed, bestemmes det, at loven sættes i kraft for Færøerne i følgende affattelse:
>
> (§ 1, § 2 .... § 21, ið eru ásetingarnar í lógini)
>
> ______________________________
>
> [2)] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, men kan ved kongelig anordning sættes i kraft for disse landsdele med de afvigelser, som de særlige færøske og grønlandske forhold tilsiger."

#### 4.5.2.2. Høvuðslóg og seinni lógarbroytingar verða settar í gildi

Verður við lógaruppskotinum høvuðslógin og seinni broytingar settar í gildi í Føroyum í senn, eiga allar ríkislógirnar, tvs. bæði høvuðslógin og broytingarlógirnar, at verða nevndar í innganginum:

Dømi: Anordning nr. 1472 frá 16. december 2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed:

> I medfør af § 97 [1)] i lov nr. 451 af 22. maj 2006 om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed, § 4 [2)] i lov nr. 537 af 17. juni 2008 om ændring af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed (Autorisation som social- og sundhedsassistent), § 5, stk. 2, [3)] i lov nr. 538 af 17. juni 2008 om ændring af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed (Autorisation som social- og sundhedsassistent), § 9, stk. 2, [4)] i lov nr. 706 af 25. juni 2010 om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet, lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed, sundhedsloven og forskellige andre love (Et nyt patientklagesystem, mulighed for at klage over sundhedsvæsenets sundhedsfaglige virksomhed, forenkling af regler om tilsynsforanstaltninger m.v.), § 3, stk. 2, [5)] i lov nr. 155 af 26. februar 2011 om ændring af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed (Autorisation som optometrist m.v.) og § 4, stk. 2, [6)] i lov nr. 361 af 9. april 2013 om ændring af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed (Midlertidig autorisationsfritagelse ved

manglende medvirken ved tilsyn og mulighed for Sundhedsstyrelsen for at stille sundhedsmæssige krav til behandlingssteders virksomhed) fastsættes, at lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed skal gælde for Færøerne i følgende affattelse:

§§1-95 (ásetingarnar í lógini)

---

**Endanotur**

[1] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "§ 97. Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, men kan ved kongelig anordning sættes helt eller delvis i kraft for Færøerne med de afvigelser, som de særlige færøske forhold tilsiger."
[2] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "§ 4. Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, men kan ved kongelig anordning sættes helt eller delvis i kraft for Færøerne med de afvigelser, som de særlige færøske forhold tilsiger."
[3] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "Stk. 2. § 1, nr. 1, 7 og 16-24, og § 2 kan ved kongelig anordning sættes helt eller delvis i kraft for Færøerne med de afvigelser, som de særlige færøske forhold tilsiger."
[4] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "Stk. 2. Loven kan ved kongelig anordning sættes helt eller delvis i kraft for Færøerne med de afvigelser, som de færøske forhold tilsiger."
[5] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "Stk. 2. Loven kan ved kongelig anordning sættes helt eller delvis i kraft for Færøerne med de afvigelser, som de færøske forhold tilsiger."
[6] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "Stk. 2. Loven kan ved kongelig anordning sættes helt eller delvis i kraft for Færøerne med de afvigelser, som de færøske forhold tilsiger."

### 4.5.2.3. Broyting í ríkislóg fyri Føroyar

Í innganginum til eina ríkislóg, sum skal seta eina broytingarlóg í gildi, eigur bara at verða víst til eina ríkislóg, sum er galdandi og kunngjørd í Føroyum.

Dømi við ríkislóg: Lov nr. 731 frá 25. juni 2014 om ændring af lov for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse:

I lov nr. 462 af 17. juni 2008 for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse foretages følgende ændringer:

### 4.5.2.4. Broyting í anordning

Í innganginum til eina anordning (ændringsanordning), sum skal seta eina broytingarlóg í gildi, eigur bara at verða víst til eina anordning, sum er galdandi og kunngjørd í Føroyum.

Tá verður í innganginum til anordningina víst til ta donsku ríkislógina, sum heimilar ráðharranum at seta broytingarlógina í gildi í Føroyum. Eins og við vanligum broytingarlógum verða í § 1 broytingarnar í lógini settar upp í nummarrøð. Í innganginum til

grein § 1 skal verða víst til heitið á lógini (anordningini), sum skal verða broytt, soleiðis sum hon er kunngjørd í Føroyum. § 2 er vanliga gildiskomuásetingin.

Dømi við anordning: Anordning nr. 677 frá 17. juni 2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af udlændingeloven:

I medfør af § 5 [2)] i lov nr. 1511 af 27. december 2009 om ændring af udlændingeloven (Gennemførelse af forordning om en fællesskabskodeks for visa (visumkodeks), bemyndigelse til at fastsætte regler om studieaktivitet m.v.) bestemmes:

**§ 1**

I udlændingeloven, som sat i kraft for Færøerne ved anordning nr. 182 af 22. marts 2001, foretages følgende ændring:

**1.** .....

### 4.5.2.5. Savningarlóg (broytingar í fleiri lógum í einum lógaruppskoti)

Í einari savningarlóg, har gjørdar verða lógarbroytingar í fleiri lógum, sum skulu setast í gildi í Føroyum, verður í innganginum víst til ta donsku ríkislógina, sum heimilar ráðharranum at seta lógirnar (lógarbroytingarnar) í gildi í Føroyum.

Eins og í vanligum broytingarlógum fær hvør lóg sína grein. Í innganginum til hvørja grein skal verða víst til heitið á lógini, sum skal broytast, soleiðis sum hon er kunngjørd í Føroyum.

Dømi við savningarlóg: Anordning nr. 398 frá 20. apríl 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af retsplejeloven og forskellige andre love (ændringer som følge af værgemålsloven) og lov om ændring af forskellige lovbestemmelser om umyndighed m.v. (ændringer som følge af værgemålsloven):

I medfør af § 24, stk. 2,[1)] i lov nr. 389 af 14. juni 1995 om ændring af retsplejeloven og forskellige andre love (Ændringer som følge af værgemålsloven) og § 35, stk. 3, [2)] i lov nr. 386 af 22. maj 1996 om ændring af forskellige lovbestemmelser om umyndighed m.v. (Ændringer som følge af værgemålsloven) fastsættes:

**§ 1**

I lov nr. 242 af 8. maj 1917 om aftaler og retshandler på formuerettens område, som ændret ved § 3 i anordning nr. 150 af 21. marts 1988, foretages følgende ændringer:

**1.** § 22 affattes således:
" **§ 22**. Kommer fuldmagtsgiveren ..."

**2.** § 24 affattes således:
" **§ 24.** Er fuldmagtsgiveren død, kommet ... "

**§ 2**

I lov nr. 146 af 13. april 1938 om gældsbreve, som ændret senest ved § 2 i anordning nr. 184 af 15. marts 198 9, foretages følgende ændring:

**1.** I *§ 17* ændres "Mindreaarighed, tinglyst Umyndiggørelse og Lavværgemaal ...”

**§ 3**

I lov om ægteskabs indgåelse og opløsning, jf. lovbekendtgørelse nr. 147 af 9. marts 1999, som sat i kraft for Færøerne ved anordning nr. 37 af 22. januar 2002, og som ændret ved § 33 i anordning nr. 228 af 15. marts 2007, foretages følgende ændringer:

**1.** I § 1 indsættes som 2. pkt.:
"Rigsombudsmanden kan ved meddelelse ..."

**(o.s.fr. §§ 4-13)**

*Endanotur:*
[1)] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "§§ 4-15, 18, 19 og 21 kan ved kongelig anordning sættes i kraft for Færøerne med de afvigelser, som de særlige færøske forhold tilsiger."
[2)] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "§§ 3, 7, 8, 19, 27, 28 og 30 kan ved kongelig anordning sættes i kraft for Færøerne med de afvigelser, som de særlige færøske forhold tilsiger."

### 4.5.3. Serlig føroysk viðurskifti

Vanliga er talan um lógartekst, sum longu er galdandi í Danmark, og tí er avmarkað, hvat føroyingar kunnu broyta í innhaldinum. Tað eigur tó altíð at verða umhugsað, um tað eiga at verða gjørdar tillagingar í lógini, so hon hóskar til føroysk viðurskifti. Hetta kann t.d. vera at víst verður til føroyskar løgtingslógir á yvirtiknum málsøki, navn á føroyskum almennum stovunum og myndugleikum, sum vera nevndir í ríkislógini o.tíl.

Eisini eigur at verða umhugsað, at revsiásetingar og møgulig kæra ella eftirlit hóskar til føroysk viðurskifti.

Tað er viðkomandi danski ráðharrin, sum ger av, um ynsktar broytingar kunnu metast at ligga innan fyri anordningsheimildina.

### 4.5.4. Gildiskoma í kongligari fyriskipan

Fyrr var vanligt at lóggávan, sum varð galdandi frammanundan einari nýggjari kongligari fyriskipan, varð sett úr gildi, samstundis sum kongliga fyriskipanin kom í gildi.

Dømi: Anordning nr. 655 frá 14. juni 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme:

> **§ 31.** Anordningen træder i kraft den 1. juli 2011.
> *Stk. 2.* Følgende lovbestemmelser ophæves:
> 1) Anordning nr. 600 af 30. november 1984 om ikrafttræden på Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme sygdomme, som senest ændret ved anordning nr. 845 af 18. december 1987 om ændring af forskellige anordninger om Færøernes sundhedsvæsen.

Síðani 2012 sæst serliga við lóggávu um fíggjarviðurskifti hjá peningastovnum o.tíl., at hetta er broytt. Tá ið konglig fyriskipan nú verður sett í gildi í Føroyum á hesum øki, sum broytir eina kongliga fyriskipan, sum longu er í gildi, verður "gamla" fyriskipanin ikki longur sett úr gildi.

Dømi: Anordning nr. 245 frá 16. marts 2012 om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed:

> **§ 375.** Anordningen træder i kraft den 1. april 2012.
> *Stk. 2.* Fonde omfattet af § 209 i anordningen skal ved ordinært eller ekstraordinært bestyrelsesmøde, generalforsamling eller lignende øverste forsamling senest 6 måneder efter anordningens ikrafttræden have bragt bestyrelsens sammensætning i overensstemmelse med § 209. Igangværende udpegningsperioder respekteres.

### 4.5.5. Kunngerðir givnar við heimild í lógini

Tað skal <u>ikki</u> verða ásett í lógini, at kunngerðir (bekendtgørelser), sum er givnar við heimild í lógini í Danmark, skulu galda í Føroyum. Løgtingið er lóggevandi og skal ikki taka støðu til kunngerðir.

Tí skulu møguligar kunngerðir, sum hava heimild í einari ríkislóg, setast í gildi, aftan á at lógin er sett í gildi í Føroyum. Hetta verður gjørt í samráð við avvarandi landsstýrismann. Sí nr. 4.2.2. um kunngerð við heimild í ríkislóg (bekendtgørelse).

### 4.5.6. Lógin hevur tilvísingar til ES-reglur, sum eisini skulu galda í Føroyum

Føroyar eru ikki partur av ES eins og Danmark. Eru tað í ríkislógini, sum skal setast í gildi í Føroyum, tilvísingar til ES-forordningar og ES-direktivir, er tað neyðugt, at hesar ES-reglur eisini eru partur av lógaruppskotinum.

Hetta verður gjørt við, at ES-reglurnar verða lagdar við lógaruppskotið sum skjøl, sum skulu kunngerast í Kunngerðablaðnum saman við kongligu fyriskipanini.

Dømi: Anordning nr. 677 frá 17. juni 2013 om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af udlændingeloven:

(Gennemførelse af forordning om en fællesskabskodeks for visa (visumkodeks), bemyndigelse til at fastsætte regler om studieaktivitet m.v.) [1)]

I medfør af § 5 [2)] i lov nr. 1511 af 27. december 2009 om ændring af udlændingeloven (Gennemførelse af forordning om en fællesskabskodeks for visa (visumkodeks), bemyndigelse til at fastsætte regler om studieaktivitet m.v.) bestemmes:

(§§ 1 og 2 eru ásetingar í lógini)

---

[1)] Som bilag med henblik på samtidig kundgørelse optages Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EF) nr. 810/2009 af 13. juli 2009 om en fællesskabskodeks for visa (visumkodeks) (Bilag 1), Kommissionens forordning (EU) nr. 977/2011 af 3. oktober 2011 om ændring af Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EF) nr. 810/2009 om en fællesskabskodeks for visa (visumkodeks) (Bilag 2), Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 154/2012 af 15. februar 2012 om ændring af forordning (EF) nr. 810/2009 om en fællesskabskodeks for visa (visumkodeks) (Bilag 3), Europa-Parlamentets og Rådets forordning nr. 767/2008 af 9. juli 2008 om visuminformationssystemet (VIS) og udveksling af oplysninger mellem medlemsstaterne om visa til kortvarigt ophold (VIS-forordningen) (Bilag 4) og Rådsafgørelse 2008/633/RIA om adgang til søgning i visumsystemet (VIS) for de udpegede myndigheder i medlemsstaterne og for Europol med henblik på forebyggelse, afsløring og efterforskning af terrorhandlinger og andre alvorlige strafbare handlinger (Bilag 5).

[2)] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, men kan ved kongelig anordning helt eller delvis sættes i kraft for Færøerne og Grønland med de afvigelser, som de færøske eller grønlandske forhold tilsiger."

## 4.6. Viðmerkingar til ríkislógartilmæli

Viðmerkingarnar til eitt ríkislógartilmæli verða gjørdar eftir sama leisti sum viðmerkingar til løgtingslógaruppskot. Sí nr. 1.2. um viðmerkingar til løgtingslógaruppskot.

Tá ið uppskot til ríkislóg verður sent føroyingum, hava donsku myndugleikarnir vanliga eisini gjørt ein stuttan samandrátt av innihaldinum í lógaruppskotinum. Hesin samandráttur kann verða umsettur og verða skrivaður inn í viðmerkingarnar á føroyskum ella kann verða lagdur við sum skjal til ríkislógartilmælið.

## 4.7. Skjøl og fylgiskjøl (ES-lóggáva)

Í ríkislógartilmælum er sjálvt lógaruppskotið hjálagt sum skjal til ríkislógartilmælið.

*Skjalið* verður hjálagt aftan á viðmerkingarnar til lógaruppskotið, og eitt yvirlit yvir hjáløgd skjøl verður sett til vinstru á síðuni, framman fyri undirskriftina hjá landsstýrismanninum.

*Fylgiskjøl* verða hjáløgd aftast í lógaruppskotinum. Yvirlit yvir hjáløgd fylgiskjøl eigur at verða sett aftan á undirskriftina hjá landsstýrismanninum og til vinstru á síðuni.

# Partur V

*Uppseting av uppskotum til samtyktar frá landsfyrisitingini*

## 5.1. Uppskot til samtyktar frá landsfyrisitingini

Uppskot til samtyktar frá landsfyrisitingini eru serliga tey mál, har tað er neyðugt hjá landsstýrinum at fáa góðkenning frá Løgtinginum sbrt. stýrisskipanarlógini § 52, stk. 2 at gera avtalur við onnur lond ella at fáa heimild at mæla til at seta í gildi fyri Føroyar millumtjóðasáttmálar.

Stýrisskipanarlógin §§ 52 og 53 eru soljóðandi:

**§ 52.** Landsstýrið hevur málsræði í førum, sum heimastýrinum er heimilað at tingast við og gera avtalur við onnur lond.
*Stk. 2.* Uttan samtykki løgtingsins kann landsstýrið tó ikki gera avtalur, sum krevja luttøku løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar.
*Stk. 3.* Samstundis sum slík avtala verður løgd fyri løgtingið til góðkenningar, boðar landsstýrið frá, hvørjar løgtingslógir og hvørji ríkislógartilmæli, neyðug eru, til tess at millumlandasáttmálin kann verða útintur.

**§ 53.** Landsstýrið ummælir heimastýrisins vegna teir millumtjóðasáttmálar, sum ríkismyndugleikarnir leggja fyri heimastýrið til ummælis.
*Stk. 2.* § 52, stk. 2 og 3, galda á sama hátt í hesum førum.

Samtykki Løgtingsins krevst til avtalur ella millumtjóðasáttmálar, sum krevja luttøku Løgtingsins fyri at vera útintar ella sum annars eru týdningarmiklar.

## 5.2. Uppseting av uppskoti til samtyktar

Dømi um uppseting av uppskoti til samtyktar: Tingmál nr. 127/2010: Uppskot til samtyktar um at góðkenna Sáttmála Evroparáðsins um at forða fyri ríkisloysi í sambandi við ríkisframhald:

**Uppskot til**

**samtyktar**

Løgtingið tekur undir við, at landsstýrið fær settan í gildi í Føroyum Sáttmála Evroparáðsins um at forða fyri ríkisloysi í sambandi við ríkisframhald (*Council of Europe Convention on the avoidance of statelessness in relation to State succession*), tá ið Danmark staðfestir sáttmálan.

## 5.3. Viðmerkingar til uppskot til samtyktar

### 5.3.1. Orsøkin til uppskotið
Í viðmerkingunum eigur at verða upplýst, hví landsstýrið leggur málið fyri Løgtingið.

Er orsøkin, at tað við góðkenningini av avtaluni ella millumtjóðasáttmálanum er neyðugt at gera *lógarbroytingar* fyri at avtalan ella sáttmálin kann verða útintur, eigur tað eisini at verða upplýst, hvørjar løgtingslógir ella ríkislógartilmæli landsstýrið heldur, at tað verður neyðugt at leggja fyri Løgtingið aftan á, at Løgtingið hevur samtykt avtaluna ella sáttmálan.

Er orsøkin at talan er um avtalu ella millumtjóðasáttmála, sum verður mettur at vera *týdningarmikil*, so skal greiðast frá, hví landsstýrið metir at so er í hesum føri.

### 5.3.2. Lýsing av innihaldinum í avtaluni ella millumtjóðasáttmálanum
Í stuttum eigur at verða greitt frá innihaldinum í avtaluni ella millumtjóðasáttmálanum. Eisini eigur at verða upplýst, í hvønn mun galdandi lóggáva er nøktandi, og hvørjar ásetingar í avtaluni ella sáttmálanum gera tað neyðugt, at lógarbroyting ella nýggj lóggáva verður gjørd.

### 5.3.3. Avleiðingar av góðkenning av avtalu ella sáttmála
Upplýst eigur at verða, hvørjar avleiðingarnar eru av at góðkenna avtaluna ella millumtjóðasáttmálan. Bæði umsitingarligar og fíggjarligar avleiðingar fyri landið, kommunur, vinnuna, borgarar og aðrar felagsskapir.

### 5.3.4. Skjøl ella fylgiskjøl
Sjálv avtalan ella millumtjóðasáttmálin verður hjálagdur sum skjal til uppskotið.

*Skjalið* verður hjálagt aftan á viðmerkingarnar til uppskotið til samtyktar, og eitt yvirlit yvir hjáløgd skjøl verður sett til vinstru á síðuni, framman fyri undirskriftina hjá landsstýrismanninum.

*Fylgiskjøl* verða hjáløgd aftast í uppskotinum til samtyktar. Yvirlit yvir hjáløgd fylgiskjøl eigur at verða sett aftan á undirskriftina hjá landsstýrismanninum og til vinstru á síðuni.

## 5.4. Góðkenning av avtalu ella sáttmála sum partur av uppskoti til lógarbroyting

Í nøkrum førum, tá ið lógarbroyting er neyðug fyri at útinna eina avtalu ella ein millumtjóðasáttmála, verður uppskot um lógarbroyting lagt fyri Løgtingið, har Løgtingið samstundis góðkennir avtaluna ella millumtjóðasáttmálan.

Tað verður gjørt við í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið at skriva t.d.:

> Sambært § 52, stk. 1 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya hevur landsstýrið málsræði í førum, sum heimastýrinum er heimilað at tingast við og gera avtalur við onnur lond, men sambært stk. 2 í somu grein kann landsstýrið ikki uttan Løgtingsins samtykki gera avtalur, sum krevja luttøku Løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar.
>
> Fyriliggjandi avtala (ella millumtjóðasáttmáli) krevur Løgtingsins luttøku fyri at verða útint, og við hesum lógaruppskoti verða gjørdar tær neyðugu broytingarnar í føroyskari lóggávu, soleiðis at Føroyar kunnu halda ásetingarnar í avtaluni (ella milumtjóðasáttmálanum).
>
> Við at samtykkja lógaruppskotið, góðkennir Løgtingið samstundis avtaluna (ella millumtjóðasáttmálan).

Tá eigur tað í viðmerkingunum á sama hátt sum við uppskotum til samtyktar í stuttum at verða greitt frá innihaldinum í avtaluni ella sáttmálanum.

Eisini eigur at verða upplýst, hvørjar lógarbroytingar verða gjørdar, og hvørjar ásetingar í avtaluni ella millumtjóðasáttmálanum gera tað neyðugt, at lógarbroyting verður gjørd.

Eisini eigur at verða upplýst, hvørjar avleiðingar eru av at góðkenna avtaluna ella millumtjóðasáttmálan. Sí nr. 5.3. um viðmerkingar til uppskot til samtyktar.

Dømi: Tingmál nr. 2/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (FATCA o.a.).

## 5.5. Millumtjóðaavtala ella sáttmáli verður innlimað sum løgtingslóg

Í nøkrum førum verður ein millumtjóðasáttmáli ella avtala beinleiðis innlimað sum løgtingslóg. Hetta merkir at sjálvur avtaluteksturin ella sáttmálateksturin gerst lógartekstur.

Avtalan ella sáttmálin er tá blivin partur av okkara rættarreglum, og hevur tá sama rættarvirknað, sum øll onnur lóggáva.

Dømi: Løgtingslóg um at seta í gildi protokoll til norðurlendskan tvískattasáttmálan viðvíkjandi skatting av eftirlønum við atliti at Føroyum og Danmark (tingmál nr. 35/2014)

Dømi: Anordning nr. 136 frá 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den Europæiske Menneskerettighedskonvention.

# Gildiskoma av hesum rundskrivi

**Gildiskoma av hesum rundskrivi**
Samsvarandi § 43, stk. 2 í fráboðan løgmans nr. 148 frá 14. november 2011 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, sum seinast broytt við fráboðan nr. 92 frá 4. september 2014, hevur løgmaður á landsstýrisfundi tann 23. februar 2015, fingið undirtøku fyri at seta hetta rundskriv í gildi frá 1. mars 2015.

Hetta rundskriv kemur í staðin fyri:

1) Rundskriv um Lógarsmíð frá 29. februar 2000.
2) Rundskriv um uppsetan av broytingum í løgtingslógum frá 17. apríl 2012.
3) Vegleiðing um uppseting av løgtingslógaruppskotum og broytingaruppskotum frá 24. juni 2002.
4) Vegleiðing um uppseting av kunngerðum og broytingarkunngerðum frá 6. februar 2003.

Skjal 1: Dømi um uppsetan av broytingum

Skjal 2: Javntekstur

Viðmerkingar og rættingar kunnu sendast til: eftirkanning@tinganes.fo.

Tinganes, 23. februar 2015

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir (sign.)

**Skjal 1**

## Dømi um uppseting av upprunalóg

Heiti á løgtingslógaruppskoti verður orðað soleiðis:

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**arbeiðsloysistrygging**
**(Møguligt stytt heiti)**

**Gildiskoma:**

Dømi:
**§ 12.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Gildiskoma og skiftisreglur:**

Dømi:
**§ 15.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2012.
*Stk. 2.* Tó kemur § 1, stk. 2 í gildi 1. september 2012.

**§ 16.** Persónar føddir millum 31. desember 1974 og 1. januar 1948, báðar dagar íroknaðar, skulu lúka treytirnar í §§ 4 og 5 seinast 31. desember 2015.
*Stk. 2.* Persónar føddir 31. desember 1947 og fyrr, skulu lúka treytirnar í §§ 4 og 5 seinast 31. desember 2016.

## Dømi um uppseting av broytingarlóg

Heiti á løgtingslógaruppskoti verður orðað soleiðis:

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ... (Møguligt stytt heiti)**
(Møguligt frágreiðandi heiti)

**Skjal 1**
*Dømi um uppseting*

---

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. ... frá ... um ..., (sum broytt við ...), verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

“**Løgtingslóg**
**um**
**Trivnaðar- og heilsuráð**”

**2.** Heitið á kapitli 2 verður orðað soleiðis:

“**Kommunuskattur**”

**3.** Yvirskriftin yvir § 3 verður orðað soleiðis:

“*Gildiskomuásetingar*”

**4.** § 1 (sum bara hevur eitt stykki) verður orðað soleiðis:
“**§ 1.** Av tí kommunuskatti ...”

**5.** § 4, stk. 1 (sum hevur fleiri stykki) verður orðað soleiðis:
“Løgtingsmenn verða valdir fyri fýra ár í senn.”

**6.** § 6, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Verður uppgerð ikki latin inn ...”

**7.** Í § 8 verður “kr. 10.000” broytt til: “kr. 5.000”.

**8.** Í § 10 verður stk. 2 strikað, og í stk. 3, sum verður stk. 2, verður orðið “øki” strikað.

**9.** § 13 verður strikað.

**10.** Tvey stykki verða broytt til eitt:
§ 20, stk. 2 og 3 verða strikað, og í staðin verður sett:
“*Stk. 2.* Reglurnar í stk. 1 eru tó bert ...”

**11.** § 23, stk. 1, 1. pkt. verður strikað.

**12.** Eitt stykki verður broytt til tvey:
§ 25, stk. 1 verður strikað, og í staðin verður sett:
“Millum ...
*Stk. 2* ...”
Stk. 2-6 verða eftir hetta stk. 3-7.

**13.** Aftan á § 29 verður sett:
“**§ 29 a.** ...

Er § 29 seinasta grein í einum kapitli, verður tilskilað, um nýggja greinin verður sett í nevnda ella fylgjandi kapittul:

**1.** Aftan á § 29 verður í kapittul 5 sett:
"**§ 29 a.** ...

**14.** Aftan á § 30 (sum er síðsta grein í kapittul 5) verður sett: (nýggjur kapittul)

"**Kapittul 5 a**
**Elektronisk tollavgreiðsla**

**§ 30 a.** Landsstýrismaðurin kann loyva elektroniskari tollavgreiðslu.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann við kunngerð áseta nærri reglur um ..."

**15.** Í § 30 (sum bara hevur eitt stykki) verður sum stk. 2 sett:
"*Stk. 2.* Skattskylduga inntøkan ..."

**16.** Í § 31 (sum hevur fleiri stykki) verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett: (hetta er bara tá ið eitt stykki kemur inn í sama stað, sum eitt annað stykki stóð frammanundan).
"*Stk. 2.* Um bygging og innrætting ..."
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

**17.** Í § 31 verða sum stk. 7, 8 og 9 sett:
"*Stk. 7.* Landingarmiðstøðin ...
*Stk. 8.* Er talan um ...
*Stk. 9.* Í heilt serligum førum ..."

**18.** Í § 35, stk. 3, sum verður stk. 4, verður "kr. 1000" broytt til: "kr. 5000".

**19.** Í § 36, stk. 1 verður sum nr. 7 sett: (tá í nr. 7 er seinasta nr.)
"7) Gjald verður ..."

**20.** Í § 37, stk. 1, verður 1. pkt. strikað.

**21.** Í § 40, stk. 1 (bert eitt punktum og fleiri verða sett afturat) verður aftan á 1. pkt. sum nýggj pkt. sett: "..."

**22.** Í § 45, stk. 1 (fleiri punktum) verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: " .... eitt ella fleiri punktum ..." (tá ið punktum verður sett inn í millum verandi punktum ella aftast)

**23.** Í § 55, stk. 1, 1. pkt. verður aftan á "fólkapensjónistar" sett: " og fyritíðarpensjónistar".

**24.** Í § 60, stk. 1, 1. pkt. og tvær staðni í § 62, stk. 3, verður "landsstýri" broytt til: "landsstýrismaðurin".

**Gildiskoma og skiftisrelgur:**

**§ 2**

Dømi:
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Dømi:
Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. mars 2012.

Dømi:
*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2012.
*Stk. 2.* Tó kemur § 1, nr. 3-7 í gildi 1. september 2012.

Dømi:
*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2012.
*Stk. 2.* Tó kemur § 29, stk. 3, sum ásett í § 1, nr. 4, í gildi 1. september 2012.

Dømi (afturvirkandi virknaður):
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. juli 2012.

**§ 3**

*Stk. 1.* Tey, ið eru byrjað útbúgvingina áðrenn 1. august 2012 ...
*Stk. 2.* Skiftisreglur...

**Skjøl sum fáa lógargildi:**
Skjal 1: Anordningsuppskot
Skjal 2: ES-reglar

Fíggjarmálaráðið, 27. mars 2014

**Navn á landsstýrismanni**
landsstýrismaður

/ Navn á embætisfólki
(Starvsheitið á embætisfólki skal ikki tilskilast)

**Fylgiskjøl sum ikki fáa lógargildi:**
Fylgiskjal 1: Ummæli frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Vinnuhúsinum
Fylgiskjal 4: Integratiónsálit
Fylgiskjal 5: Talvur um gongdina av fólkatalinum
Fylgiskjal 6: Resume

# Skjal 2

## Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1** |
| | Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 24. oktober 2012, verða gjørdar hesar broytingar: |
| | **1.** Aftan á § 10 verður sett:<br>“**§ 10 a.** Barnahúsið virkar sum karmur um tvørfakligt samstarv, tá børn undir 18 ár hava verið fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi, ella tá illgruni er um, at hesi eru ella hava verið fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi.<br>*Stk. 2.* Løgregla, ákæruvald, sosialir myndugleikar, heilsumyndugleikar, løggild heilsustarvsfólk og starvsfólk í Barnahúsinum kunnu í sambandi við málsviðgerð sbrt. stk. 1 lata upplýsingar um heilt privat viðurskifti hjá barninum og familjuni ímillum sín, tá umhugsni fyri viðurskiftum barnsins fer fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan.” |
| **§ 14.** ...<br>*Stk. 2-4.* ....<br>*Stk. 5.* Barnaverndartænastan skal boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin er móttikin. | **2.** Í § 14, stk. 5 verður sum 2. og 3. pkt. sett:<br>“Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti hesum, skal barnaverndartænastan boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin hevur ført til, at málið verður kannað, ella at fyriskipanir eru settar í verk sambært hesi lóg. Afturboðanin fevnir bert um tann, ið fráboðað er um.” |
| | **3.** Í § 14, verður sum stk. 6 sett:<br>“*Stk. 6.* Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti hesum, kann barnaverndartænastan, tá tað hevur avgerandi týdning fyri, hvørja hjálp og stuðul fráboðari sbrt. stk. 1 kann veita barninum, kunna um, hvørjar fyriskipanir eru settar í verk.” |
| **§ 18.** Í teimum førum, har orsøk er at halda, at | **4.** § 18, stk. 1 verður orðað soleiðis: |

eitt barn hevur eina lívshóttandi ella álvarsama sjúku ella skaða, er úti fyri blóðskemd ella harðskapi, og um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, ikki syrgja fyri, at barnið kemur til kanningar ella viðgerð, kann barnaverndarnevndin uttan rættarúrskurð avgera, at barnið skal til hóskandi viðgerð ella kanning.
*Stk. 2-3.* ...

"Í teimum førum, har orsøk er at halda, at eitt barn hevur eina lívshóttandi ella álvarsama sjúku ella skaða, er fyri kynsligum ágangi ella øðrum harðskapi, og um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, og barnið, ið hevur fylt 15 ár, ikki geva samtykki til, at barnið kemur til kanningar ella viðgerð, kann barnaverndarnevndin uttan rættarúrskurð avgera, at barnið skal til hóskandi viðgerð ella kanning, undir hesum viðgerð og kanning, ið Barnahúsið fyriskipar."

**§ 45.** ...
*Stk. 2-7.* ...
*Stk. 8.* Barnaverndarumsitingin kann krevja at fáa samtalu við barnið í einrúmi, um møguligt saman við serkønum fólki. Barnið eigur í hesum førum at hava hjásitara.
*Stk. 9-10.* ...

**5.** § 45, stk. 8 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 8.* Barnaverndarumsitingin skal tosa við barnið í tann mun, barnsins búning og umstøðurnar í málinum ikki tala ímóti hesum. Kann barnaverndarumsitingin ikki tosa við barnið, eigur barnaverndarumsitingin á annan hátt at fáa lýst sjónarmið barnsins. Í tann mun, atlitið til barnið talar fyri hesum, kann barnaverndarumsitingin tosa við barnið uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og uttan at hesi eru hjástødd. Barnið eigur í hesum førum at hava hjásitara."

**6.** Aftan á § 45 verður sett:
"**§ 45 a.** Tá barnaverndartænastan fær fráboðanir sbrt. § 14 um barn, ið er undir fyriskipan sambært hesi lóg, skal barnaverndarumsitingin meta um málið av nýggjum. Í sambandi við eftirmetingina av málinum skulu onnur, ið gera uppgávur fyri barnaverndartænastuna, men sum ikki hava verið partur av málsviðgerðini áður, í størst møguligan mun, vera við til at endurskoða málið."

**§ 49.** Ein kanning eftir § 45 skal gerast sum skjótast og í seinasta lagi innan tríggjar mánaðir eftir, at ein fráboðan er innkomin, ella at barnaverndarnevnd av sínum eintingum hevur tikið eitt mál upp til kanningar.
*Stk. 2-4.* ...

**7.** Í § 49, stk. 1 verður eftir "kanningar" sett: ", tó skal barnaverndartænastan beinanvegin og innan 24 tímar eftir eina fráboðan meta um, hvørt vandi er fyri barnsins heilsu og menning, og um bráðfeingis fyriskipan tí skal setast í verk".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2014.